# Álit

## um føroyskt heiðurstekin

Á flaggdegnum
25. apríl 2026

# Handanarskriv

Við hesum handar nevndin, sum varð sett at gera uppskot um eina skipan við føroyskum heiðurstekni, løgmanni sítt álit.

Tórshavn, á flaggdegnum hin 25. apríl 2026

Sólja í Ólavsstovu
forkvinna

Jóan Pauli Joensen

Dan M. Knudsen

Urd Johannesen

Durita Lamhauge Jóansdóttir
skrivari

Álit um føroyskt heiðurstekin
Útgivið: 25. apríl 2026
Útgevari: Løgmansskrivstovan
Málslig gjøgnumgongd og uppseting: Sprotin
Prent: Estra
Útgáva: 1. upplag

Sniðuppskotið í hesum áliti er vart sambært galdandi upphavsrættarligum reglum umframt møguligum viðkomandi reglum um sniðgevingarrætt. Almannakunngerð av hesum áliti merkir ikki, at sniðuppskotið frítt kann gerast tøkt fyri almenninginum, nýtast, avritast ella á annan hátt gagnnýtast av øðrum til onnur endamál enn tey, sum eru nevnd í hesum áliti og tilhoyrandi fylgiskjølum. Upphavsrætturin til sniðuppskotið er hjá Edward Fuglø. Nýtsla ella gagnnýtsla av sniðuppskotinum krevur frammanundan samtykki frá upphavsrættarhavaranum, uttan so, at annað er avtalað við upphavsrættarfólkið. Verður sniðuppskotið brúkt í ósamsvar við galdandi upphavsrættarlóggávu, t.d. víst alment í miðlum, sosialum miðlum, tíðarritum v.m., er hetta ikki ábyrgd hjá Løgmansskrivstovuni. Mælt verður til at seta seg í samband við upphavsrættarfólkið, áðrenn slík nýtsla verður framd.

# Álit um føroyskt heiðurstekin

# Innihald


1. kapittul 7

1.1 Inngangur 9

1.2 Arbeiðssetningur 9

1.3 Arbeiðsháttur 10

1.4 Orðingar í føroyskari heiðursteknaskipan 11

Nevndin mælir til 12

1.5 Bygnaður á álitinum 13

2. kapittul Meginreglur í eini tignarmerkjaskipan 15

2.1 Søguligi upprunin til tignarmerkini 17

2.2 Tignarmerkjaskipanir í dag 18

3. kapittul Ein føroysk tignarmerkjaskipan 21

3.1 Endamálið við eini føroyskari tignarmerkjaskipan 23

Nevndin mælir til 23

3.2 Ein nútíðar føroysk tignarmerkjaskipan við einum stigi 24

Nevndin mælir til 25

3.3 Tignarmerkjaskipanin og útlendingar 26

Nevndin mælir til 27

3.4 Føroyska tignarmerkjaskipanin og handan 27

Nevndin mælir til 29

3.5 Tignarmerkjanevndin 29

Nevndin mælir til 31

3.6 Fyrisitingarlig fyrilit 31

Nevndin mælir til 32

3.7 Uppgávur tignarritarans 32

Nevndin mælir til 33

3.8 Útilokan frá at fáa tignarmerkið 33

Nevndin mælir til 33

4. kapittul Útsjónd og framleiðsla 35
4.1 Sniðgevingartilgongdin 37
Nevndin mælir til 38
4.2 Innsignir á Tignarmerki Føroya 38
4.3 Framleiðslan 46
Nevndin mælir til 46
4.4 Framleiðslu- og fyrisitingarkostnaður 46
Nevndin mælir til 47

Fylgiskjøl 49
Fylgiskjal 1: Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin og Álit frá Mentanarnevndini 51

Fylgiskjal 2: Uppskot til Løgtingslóg um Tignarmerki Føroya 57

Fylgiskjal 3: Uppskot til reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar 73

Fylgiskjal 4: 79
Bakstøði um norðurlendsku tignarmerkjaskipanirnar 79
1. Danska tignarmerkjaskipanin 80
2. Grønlendska tignarmerkjaskipanin 84
3. Íslendska tignarmerkjaskipanin 85
4. Norska tignarmerkjaskipanin 88
5. Svenska tignarmerkjaskipanin 91
6. Privat føroyskt tignarmerki 94

# 1. KAPITTUL

## 1.1 Inngangur

Tann 7. mars í 2022 løgdu løgtingsfólkini Bjørt Samuelsen, Ruth Vang, Kristin Michelsen, Helgi Abrahamsen, Christian Andreasen og Bill Justinussen fram løgtingslógaruppskot við heitinum „Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin". Í álitinum frá Mentanarnevndini tann 26. apríl í 2022 tók meirilutin undir við uppskotinum, og Løgtingið samtykti uppskotið tann 28. apríl í 2022. Løgtingssamtyktin, hereftir nevnd løgtingssamtyktin, var soljóðandi:

„Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um føroyskt heiðurstekin at lata persónum fyri merkisvert arbeiði ella gerning, ið gagnar landi og fólki og tænir Føroyum".

Í viðmerkingunum til løgtingssamtyktina varð heitt á Løgmansskrivstovuna um at seta arbeiði í gongd at kanna, hvussu ein føroyskur heiður kundi skipast, við reglum um, hvussu persónar verða tilnevndir og valdir til slíkan heiður. Harumframt skuldi arbeiðið fevna um útsjóndina á einum føroyskum heiðurstekni, og hvussu nógv stig tað skuldi hava.

Løgtingssamtyktin og álitið frá Mentanarnevndini eru viðløgd sum fylgiskjal 1. Sí eisini løgtingsmál LM-120/2021 á www.logting.fo.

## 1.2 Arbeiðssetningur

Í november í 2023 setti Aksel V. Johannesen løgmaður eina nevnd, hereftir kallað nevndin, við fýra fólkum, hvørs uppgáva var at gera fullfíggjað uppskot um eina skipan við føroyskum heiðurstekni. Endaliga uppskotið skuldi latast løgmanni til politiska viðgerð. Uppgávan fevndi m.a. um at:

- Orða endamálsorðing fyri heiðursmerkjaskipanina.
- Gera reglur fyri, hvussu heiðursmerkjaskipanin skal verða uppbygd, hvussu tilnevningin skal fara fram, og hvussu heiðursmerki skulu handast.

- Gera reglur fyri ta nevnd, sum eftirfylgjandi skal sita fyri heiðursmerkjaskipanini og hava hana um hendi.
- Viðgera, hvussu nógv ein slík skipan kostar at framleiða og síðan at fyrisita.
- Sniðgeva eina slíka skipan við litum, formi, myndevni og tilfari, har fyrilit verður havt fyri heraldiskum meginreglum.
- Kanna aðrar líknandi skipanir í viðkomandi londum rundan um okkum.
- Viðgera, hvussu heiðursmerkjaskipanin skal grundfestast formliga í føroysku politisku skipanini.

Limirnir í nevndini hava verið:

Sólja í Ólavsstovu, forkvinna, fyrrverandi Løgtingsins umboðsmaður.
Jóan Pauli Joensen, professari, fyrrverandi rektari á Fróðskaparsetri Føroya.
Dan M. Knudsen, fyrrverandi ríkisumboðsmaður.
Urd Johannesen, mentanarsamskipari í Runavíkar Kommunu.
Durita Lamhauge Jóansdóttir, skrivari (fulltrúi í Uttanríkis- og fiskimálaráðnum og fyrrverandi protokollstjóri).

Tann 25. februar 2026 útskrivaði Aksel V. Johannesen løgmaður løgtingsval at vera tann 26. mars í 2026. Á flaggdegnum hin 25. apríl 2026 handaði nevndin Beini Johannesen løgmanni sítt álit við heitinum „Álit um føroyskt heiðurstekin".

## 1.3 Arbeiðsháttur

Í síni arbeiðstilgongd hevur nevndin tulkað arbeiðssetningin út frá løgtingssamtyktini og viðmerkingunum, sum hoyra til. Nevndin metir, at Løgtingið ynskir at gera eina nýmótans skipan, sum hóskar til føroyska samfelagið í dag, og tilmælini í hesum áliti taka útgangsstøði í hesi fatan.

Støðan í dag er tann, at Føroyar hava ikki eitt heiðurstekin, sum er landsins hægsti heiður, ið fevnir um alt samfelagið at lata persónum fyri fyrimyndarligt merkisvert avrik. Føroyskur heiður av hesum slag verður latin í ávísum geirum í samfelagnum. Á mentanarøkinum letur landið Mentanarvirðisløn landsins og heiðursgávu. Viðvíkjandi tilbúgving letur landið heiðurstekin fyri 25 og 40 ára tænastu og fyri serlig avrik í tilbúgvingini. Kommunurnar heiðra somuleiðis borgarar á ymsan hátt. Sambært skjølum hjá Løgmansskrivstovuni hava ávís heiðurstekin verið latin í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1957 til 1975. Tey vóru lík eini medalju og avmarkað til valaavrik í fiskiskapi, bóndaskapi og bjarging. Statsligu heiðurstekini letur danska kongshúsið føroyingum eftir teimum ásetingum, sum danska skipanin setur.

Fyri at fáa íblástur og vitan um, hvussu ein føroysk skipan skal setast saman, hvussu heiðursteknið skal síggja út, og hvussu málfrøðin í eini føroyskari skipan skal vera, hevur

nevndin havt fundir við persónar í Føroyum við vitan og førleikum, sum eru hildin at vera viðkomandi fyri eitt føroyskt heiðurstekin. Nevndin hevur somuleiðis leitað sær vitan og íblástur hjá fakfólki í Danmark, Íslandi og Grønlandi.

Nevndin hevur havt hesar fundir og vitjanir:

Innanhýsis fundir hjá nevndini.

- Fundir við Málráðið.
- Fundur við Ríkisumboðið.
- Smærri hugaroksfundir við luttøku frá persónum við vitan um: Søgu, mál, fólkalívsfrøði, geologi, list, fornaldarfrøði, samfelagsviðurskifti og samskifti.
- Fundur við danska forsætismálaráðið.
- Fundir við ordanarkapitlið hjá danska kongshúsinum.
- Vitjað donsku fyritøkuna M. W. Mørch og Søn's eftf., sum hevur framleitt heiðurstekin til danska kongshúsið.
- Fundur við nevndarlimir í ordanarnevndini í Íslandi.
- Fundur við stjóran á íslendsku forsetaskrivstovuni.
- Fundur við umboð úr íslendska heraldiska selskapinum.
- Fundur við forseta Íslands, Guðni Th. Jóhannesson.
- Vitjað íslendska handilin Prakt, hvørs gullsmiður framleiðir heiðurstekin til íslendsku forsetaskrivstovuna.
- Fundur við stjóran í Grønlendska tinginum.
- Vitjað Tjóðsavnið.
- Fundir við Aksel V. Johannesen løgmann og Bjørt Samuelsen løgtingsforkvinnu.
- Fundur við stjóran í Uttanríkistænastuni í Uttanríkis- og mentamálaráðnum.
- Fundir við felagsskapir og áhugabólkar í sambandi við at fyrireika hugskotskapping.
- Fundir við dómsnevndina um hugskotskapping.
- Fundir við útvalda listafólkið frá hugskotskappingini og føroyskan framleiðara.
- Fundur við deildarstjóran og fulltrúa í Mentanardeildini í Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

## 1.4 Orðingar í føroyskari heiðursteknaskipan

Tá ið nevndin byrjaði sítt arbeiði, metti hon, at tørvur er á einum føroyskum orði, sum breitt fevnir um orðini -heiðursmerki, -heiðurstekin og danska orðið -dekorationer, men sum samstundis ítøkiliga vísir til eitt serstakt føroyskt heiðurstekin, sum landið letur. Orðið heiðursmerki er nakað breitt og vanligt, eitt nú í ítróttarhøpi. Harumframt kunnu orð samansett við annaðhvørt -tekin ella -tekn koma í bland við onnur orð. Í samráð við Málráðið kom nevndin ásamt um at nýta orðið -tignarmerki sum felagsheiti, har seinni orðliðurin eisini sipar til heitið á føroyska flagginum Merkinum. Fyrri orðliðurin -tign verður síðan settur

saman við øðrum orðum at nýta í eini føroyskari skipan, so at skipanin fær ein málfrøðiligan samanhang.

Nevndin hevur umrøtt, hvat orð skal nýtast fyri at lýsa útsjóndina á einum føroyskum tignarmerki, tá orðið -útsjónd ikki verður mett at hava nøktandi innihaldsligan týdning. Ymsu norðurlendsku ordanarskipanirnar nýta latínska orðið -insigne (-insignia fleirtal), sum merkir tekin ella súmbol. Insignia fevnir um eina nágreiniliga lýsing av øllum teimum sjónligu sereyðkennum (snið, litir, súmbol og tilfar), sum saman mynda útsjóndina á eini ordan ella medalju. Insignia kunnu sporast aftur til fornøldina, har fysiskir súmbolskir prýðislutir vórðu nýttir av herdeildum og aðalinum fyri at vísa tilknýti og tignarstig. Nevndin heldur, at føroyska skipanin á sama hátt eigur at hava eitt orð, ið lýsir samlaðu serstøku útsjóndina á føroyska tignarmerkinum, og hevur gjørt av at gera latínska orðið -insigne um til eitt føroyskt hvørkikynsorð, -innsigni, ið verður bent eftir sama mynstri sum -kvæði. Dømi um hvørfalsbending eru hesi: -innsigni (óbundið eintal), -innsigni ella innsignir (óbundið fleirtal) og -innsignini (bundið fleirtal).

Í álitinum og í viðløgdum fylgiskjølum nýtir nevndin orðingarnar niðanfyri um eina føroyska skipan, og hesar orðingar eru somuleiðis fyrstu tilmæli nevndarinnar.

## Nevndin mælir til:

- At eitt føroyskt heiðurstekin, sum víst verður til í løgtingssamtyktini frá 28. apríl 2022, fær almenna felagsheitið „tignarmerki".
- At skipanin fær heitið „tignarmerkjaskipan".
- At nevndin, sum fær fyrisitingarligu ábyrgdina av tignarmerkinum, fær heitið
- „tignarmerkjanevnd".
- At ritarin í tignarmerkjanevndini fær heitið „tignarritari".
- At tann persónur, sum fær handað tignarmerkið, fær heitið „tignarberi".
- At ítøkiliga navnið á føroyska tignarmerkinum verður „Tignarmerki Føroya".
- At føroyska tignarmerkjaskipanin nýtir orðið -innsigni sum eitt hugtak, ið fevnir um øll tey sjónligu sereyðkenni, ið saman mynda útsjóndina á Tignarmerki Føroya.

## 1.5 Bygnaður á álitinum

Álitið hevur 4 kapitlar.

Kapittul 1 inniheldur arbeiðssetning, frágreiðing um arbeiði nevndarinnar og tilmæli um orðingar í føroyskari tignarmerkjaskipan.

Kapittul 2 lýsir meginreglurnar í tignarmerkjaskipanum sum heild.

Kapittul 3 viðger ymsu atlitini og tættirnar í eini føroyskari tignarmerkjaskipan og inniheldur flestu tilmæli nevndarinnar. Tilmælini koma síðst eftir hvønn frágreiðandi tekstpart.

Kapittul 4 lýsir sniðgevingartilgongdina, kemur við tilmæli um, hvørji innsignir Tignarmerki Føroya skal hava, og viðger framleiðslu og kostnað.

Tað eru fýra fylgiskjøl til álitið. Fylgiskjal 1 er løgtingslógaruppskotið til samtyktar um føroyskt heiðurstekin frá 2022 og álitið frá Mentanarnevndini. Fylgiskjal 2 er uppskot nevndarinnar til løgtingslóg um eitt nýtt føroyskt heiðurstekin kallað „Uppskot til løgtingslóg um Tignarmerki Føroya". Fylgiskjal 3 er uppskot nevndarinnar til reglugerð fyri virksemið hjá tignarmerkjanevndini. Hetta er tann nevnd, sum mælt verður til skal viðgera innkomin uppskot um teir persónar, sum kunnu fáa Tignarmerki Føroya. Fylgiskjal 4 greiðir frá tignarmerkjaskipanunum í Norðurlondum.

2. KAPITTUL

# Meginreglur í eini tignarmerkjaskipan

## 2.1 Søguligi upprunin til tignarmerkini

Fyri at skilja grundleggjandi meginreglurnar í eini tignarmerkjaskipan verða søguliga gongdin og høvuðstættirnir í slíkari skipan lýst. Danska orðið -orden, á enskum -order, kemur av latínska orðinum -ordo, ið merkir ein avmarkaður skari av fólki, ið átekur sær ávísar skyldur og bindur seg til at fylgja ávísum reglum. Verður sligið upp í donsk-føroysku orðabókini hjá Sprotanum eftir orðinum -orden, merkir tað eitt -lag, -felag, -felagsskapur ella -regla. Víst verður til munkalag, nunnulag og frímúrarafelagsskapin. Í hesum áliti verður orðið -lag ella kvennkynsformurin -ordan nýtt fyri danska orðið -orden.

Skipanin við ordanum stavar frá evropisku miðøldini og er sprottin úr miðaldarliga skipanarliga bygnaðinum hjá katólsku kirkjuni, ítøkiliga kirkjuligu skipanunum við munkasamfeløgunum. Tá ið krossferðartíðin kom, tóku riddararnir lagsskipanina og tilhoyrandi tignarmerkir til sín. Nógv kirkjulig riddaraløg vórðu stovnað, hvørs høvuðsendamál var at berjast fyri kristnu trúnni og at verja pílagrímar og sjúk. Limirnir í ymsu riddaraløgunum skuldu játta at binda seg til virðini hjá viðkomandi riddaralagi, og ymsu løgini vóru undirløgd pávanum. Tey virkaðu annars sjálvstøðugt við egnum leiðara (stórmeistara ella ordanarharra) og egnari skipan (ordanarkapitli). Seinni orðliðurin -kapittul hevur røtur úr gomlu kirkjuligu skipanini við munkaløgunum. Við tíðini broyttust uppgávurnar hjá ymsu riddaraløgunum. Kongsveldini yvirtóku skipanina við tignarmerkjum, og tær annars kirkjuligu skipanirnar gjørdust verðsligar. Tað, at fleiri lond í dag nýta krossin, við ymsum samansetingum, sum berandi súmbol í sínum tignarmerkjum, stavar frá kirkjuliga upprunanum.

Í kjalarvørrinum av fronsku kollveltingini, og síðan fólkaræðisligu tilgongdini, varð tað ikki longur bert ein serliga útvaldur skari í kongligu familjuni og aðalinum, sum av sær sjálvum fekk tignarmerkir. Borgarar og útlendingar fingu tey nú eisini sum eina viðurkennandi tøkk fyri sítt virði og avrik fyri samfelagið.

## 2.2 Tignarmerkjaskipanir í dag

Í dag er tað ríkisovastin (kongur, drotning ella forseti), ið ræður yvir skipanini við tignarmerkjum, serliga ordanum. Av tí at Føroyar eru partur av danska kongsríkinum, merkir hetta, at tað er kongur, sum ræður yvir Dannebrogsordanini og kongligu medaljunum, sum eisini verða handaðar føroyingum. Í Íslandi er tað forsetin, ið ræður yvir Falkaordanini. Í Svøríki og Noregi ræður kongur yvir ordanunum og kongligu medaljunum. Grønland hevur eina medalju, sum formansskapurin í grønlendska tinginum ræður yvir. Nærri lýsing av ymsu norðurlendsku skipanunum er í fylgiskjali 4.

Ein tignarmerkjaskipan kann hava fleiri ordanir og medaljur til ymisk endamál, og er vanliga regulerað við statuttum. Hetta eru viðtøkur hjá kongi, sum staðfesta endamálið við tignarmerkinum, hvussu nógv stig eru, hvussu tað skal fyrisitast, tilmælast, handast, uppstigast, hvør skal útilokast, og hvørji innsignini eru. Hægsta fyrisitingarliga eindin fyri kongligar ordanir og medaljur verður í Danmark, Svøríki og Noregi kallað eitt ordanarkapittul. Hetta eru fyrisitingar beinleiðis undir kongi. Í ordanarkapitlunum er tað kongur, sum er ordanarharri ella stórmeistari, og sum tekur endaliga avgerð um, hvør skal fáa eina ordan ella medalju. Í Íslandi er tað forsetaskrivstovan, sum tekur sær av hesum, og forsetin er stórmeistari og tekur endaliga avgerð. Í Grønlandi er tað formansskapurin í tinginum, ið situr fyri grønlendsku medaljuni og tekur avgerð um handanir í samráð við grønlendsku stjórnina. Knýttar at ordanarkapitlunum eru ráð ella nevndir, sum út frá ymsum meginreglum meta um, hvør skal fáa eina ordan ella medalju. Noreg hevur ordanarráð og medaljuráð, sum koma við tilmælum til kong. Svøríki hevur eitt ordanarráð, sum gevur svensku stjórnini síni tilmæli. Stjórnin kemur síðan við innstillingum til ordanarkapitlið, har kongur tekur avgerð. Ísland hevur eina ordanarnevnd, sum gevur forseta Íslands síni tilmæli. Danmark hevur ikki eitt ráð ella eina nevnd knýtta at ordanarkapitlinum.

Bæði ordanir og medaljur eru heiðurlig tignarmerkir, sum staturin letur, men tað er søguligur munur á teimum. Tá ið persónar fyrr fingu handað eina ordan, gjørdust teir limir í tí lagi, sum hetta tignarmerki hoyrdi til. Limirnir skuldu svørja lagnum trúskap og harvið kongi, sum oftast var ordanarharri. Ein medalja varð handað persónum uttan krav um limaskap og trúskap. Har var tað gevarin, sum vísti móttakaranum sína viðurkenning. Grundað á søguliga upprunan frá miðøldini og sambandið millum lagsskipanirnar, einaveldini og evropiska statin eru tignarmerkjaskipanirnar í evropiskum londum nógv stýrdar av, at ordanirnar eru berandi liðið í skipanini. Hinvegin hevur USA ikki aldagamlar ordanarskipanir, við tað at USA søguliga ikki er sprottið beinleiðis úr miðøldini, sum evropisk lond. USA nýtir medaljur sum fínastu viðurkenning. *Congressional Gold Medal* og *Presidential Medal of Freedom* eru hægsta viðurkenning til borgarar, og *Medal of Honor* er hægsta viðurkenning í amerikanska herinum.

Í dag er eingin ítøkiligur innihaldsligur munur á ordanum og medaljum, tí at persónar ikki longur formliga verða upptiknir sum limir í einum statsligum lagi. Bæði ordanir og medaljur eru tignarlig statslig viðurkenning. Munurin kann vísa seg við, at ordanir í nógvum førum

halda seg til gamlar skipanir, fevna um automatiskar handanir til ávísar bólkar og høgtstandandi persónar, hava ofta fleiri stig, har møguleiki er at uppstiga fólk í skipanini, og verða nýttar í diplomatiskum sínámillum viðurkennandi handanum millum lond. Medaljurnar verða handaðar breiðari til persónar fyri ítøkilig fyrimyndarlig valaavrik á ymiskum økjum, og tær hava ofta eitt ella tvey stig. Tað kann hava praktiskan týdning, um persónur hevur fingið handað fleiri ordanir og medaljur og skal bera tær, tá ið leiðbeiningar eru um, í hvørji røð ordanir og medaljur skulu berast. Innsignini á eini ordan eru ofta ein krossur ella stjørna við motivum og súmbolum, og medaljurnar kunnu hava rund snið við útskeringum, motivum og súmbolum. Ordanir hanga vanliga um hálsin ella á bringuni og skulu berast til fín klæðir alt eftir tignarstigi. Medaljurnar hanga vanliga vinstrumegin á bringuni og hava ikki somu krøv til klædnadrakt.

3. kapittul

# Ein føroysk tignarmerkjaskipan

## 3.1 Endamálið við eini føroyskari tignarmerkjaskipan

Hóast evropisku tignarmerkjaskipanirnar stava frá gamlari tíð, hava flestu lond hildið fast um eina skipan við ordanum og medaljum. Ein grund er, at staturin á henda hátt kann vísa persónum takksemi og viðurkenning fyri fyrimyndarlig avrik, sum hava tænt móðurlandinum og gagnað samfelagnum og menniskjanum sum heild. Í viðmerkingunum til løgtingssamtyktina stendur, at „Føroyar eiga at hava eitt føroyskt heiðurstekin, eina ærumedalju - almennan heiður - ið kann latast kvinnum og monnum, sum á serstakan, dyggan og rósuuppibornan hátt tæna landi og fólki. Persónar, sum uttan mun til starvsøki ella samfelagsstætt gera nakað serstakt og merkisvert í virkni og verki sínum í samfelagnum. Persónar, sum ganga undan og eru ein góð fyrimynd fyri uppvaksandi ættarliðið og fyri okkum øll.

Hetta kann vera í øllum liðum í samfelagnum. Innan almenna tænastu, vinnulív, list, vísindi, heilsufremjan, fakfelagsarbeiði, tónleik, ítrótt, manngóðum og sjálvbodnum arbeiði og so frameftir. Heiðurin skal, umframt føroyingum, eisini kunna latast útlendingum, sum gera eitthvørt serstakt fyri Føroyar“.

Nevndin metir, at løgtingssamtyktin og viðmerkingarnar tilsamans siga greitt, hvat endamálið skal vera við føroyskari tignarmerkjaskipan. Út frá hesum verður mælt til at gera eitt løgtingslógaruppskot, ið leggur grundarlagið undir føroyska tignarmerkjaskipan, sum skal gera tað møguligt hjá landinum at heiðra egnar borgarar og útlendingar fyri fyrimyndarligt merkisvert og serstakt avrik, ið gagnar landi og fólki, og sum tænir Føroyum ella umheiminum. Av tí at Føroyar ikki hava møguleikan í dag at vísa egnum borgarum og útlendingum súmbolska viðurkenning á hægsta stigi, ber til at siga, at tørvur er á hesum.

## Nevndin mælir til:

- At endamálið við føroyskari tignarmerkjaskipan skal vera at gera tað møguligt at heiðra egnar borgarar og útlendingar fyri fyrimyndarligt, merkisvert og serstakt avrik, ið gagnar landi og fólki, og sum tænir Føroyum ella umheiminum.

### 3.2 Ein nútíðar føroysk tignarmerkjaskipan við einum stigi

Nevndin heldur tað vera skynsamt at gera eina føroyska tignarmerkjaskipan, sum ikki er ein ordanarskipan, men sum byggir á íblástur frá skipanarligu meginreglunum hjá bæði ordanum og medaljum. Tí tað er ríkisovastin, sum ræður yvir eini ordan, og henda gamla skipan myndar eina tíð, har tað var natúrligt at gera mun á fólki. Tað liggur í løgtingssamtyktini, at føroyskir myndugleikar skulu ráða yvir føroysku tignarmerkjaskipanini, og at hon sum útgangstøði ikki skal gera mun á fólki. Ein nýggj skipan eigur at byggja á tann fólkaræðisliga virðis- og siðaarv, sum Føroyar sum land, samfelag og tjóð eru sprotnar úr, byggja á og framhaldandi vilja byggja á. Hon eigur at verða tillagað nútíðar samfelagnum, har allir borgarar sum útgangsstøði høvdu kunnað fingið handað føroyska tignarmerkið, um viðkomandi atlit og meting talaðu fyri tí. Bygnaðurin eigur at kunna kjølfestast í galdandi samfelagsskipanir uttan at sleppa tí grundvølli, sum tignarmerkir byggja á. Í hesum sambandi hevði tað verið skynsamt at gjørt eitt tignarmerki, sum formliga hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum, og sum kann berast á klædnabúna saman við donskum og útlendskum tignarmerkjum. Grønland gjørdi í 1989 sína egnu tignarmerkjaskipan, tá ið heimastýrið fylti 10 ár. Grønlendska tignarmerkið er ein medalja, og formansskapurin í grønlendska tinginum ræður yvir skipanini. Tignarmerkið hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum og verður borið saman við øðrum tignarmerkjum, tá ið tað er viðurkent (approberað) av kongi.

Álitið á føroysku skipanina verður tongt at, hvussu skipanin verður sett saman og handfarin. Skipanin má vera politiskt óheft og álítandi í sínum virksemi og umdømi og eigur ikki at vera automatisk, so at persónar í ávísum størvum, lønarflokki ella samfelagsbólkum fáa tignarmerkið uttan at hava avrikað nakað fyrimyndarliga merkisvert og serstakt fyri føroysku tjóðina ella umheimin. Tað er automatikkur í donsku skipanini, har persónar grundað á sítt embæti kunnu fáa annaðhvørt riddarakrossin ella eina medalju (ikki bæði). Hesin hierarkiski automatikkur í gomlu skipanunum var ein av grundunum til, at Svøríki frá 2018 til 2023 arbeiddi við at nútíðargera sína tignarmerkjaskipan. Tað er framvegis automatikkur í svensku skipanini, men skipanin hevur eisini eitt ráð, sum ítøkiliga metir um avrik í sambandi við at tilmæla persónar til fleiri av svensku tignarmerkjunum. Tá ið Ísland í 1944 gjørdist lýðveldi og harvið fekk ræði á skipanini við Falkaordanini, varð sett ein ordanarnevnd at meta um, hvør skuldi fáa ordanina. Skipanin er sprottin úr Dannebrogsordanini og hevði tískil í fyrstuni sama automatikk. Við tíðini gjørdist skipanin minni automatisk og byggir í dag fyri tað mesta á ítøkiligar metingar av avrikum hjá persónum.

Tað er grundleggjandi fyri føroysku skipanina, at landsins hægsti heiður verður ein viðurkennandi tignarmerkjaskipan, hvørs trúvirði og legitimitetur byggja á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum, sum verður eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni. Til hetta endamál eigur ein sjálvstøðug og óheft tignarmerkjanevnd at verða sett, sum fær til uppgávu at taka ímóti øllum uppskotum um persónar, sum høvdu kunnað fingið føroyska tignarmerkið. Nevndin eigur sjálv at kunna koma við uppskotum. Nevndarlimir skulu tó ikki skjóta upp seg sjálvan ella aðrar sitandi nevndarlimir. Nevndin eigur ítøkiliga at meta um

innkomin uppskot og at gera eitt samt tilmæli til løgmann um, hvørjir persónar verða mettir at hava uppiborið tignarmerki. Semja hevur týdning fyri ikki at sáa iva um metingarevnini hjá tignarmerkjanevndini, og um teir persónar, sum fáa handað tignarmerkið. Tignarmerkjanevndin eigur at leggja seg eftir at tilmæla persónar, sum fólk flest kunnu taka undir við.

Tað eigur at metast um, hvat eitt fyrimyndarligt merkisvert og serstakt avrik er. Slík heiðursverd avrik fara út um tað, sum vanliga kann væntast av einum persóni í ávísum leikluti ella ávísum samanhangi í samfelagnum, sama hvør viðkomandi persónur er. Tað kunnu vera einstøk avrik ella lívsverk yvir langt tíðarskeið. Harumframt verða heiðursverd avrik framd í øllum pørtum av samfelagnum. Eftir hesi avrik liggur munagott og varandi gagn fyri samfelagið og menniskjað, sum hevur uppiborið ein serligan tjóðarheiður. Sambært viðmerkingunum til løgtingssamtyktina er talan um avrik hjá kvinnum og monnum, „sum gjøgnum starv, eldhuga og gerningar sínar vinna Føroyum og føroyingum vitan, framburð, mentan, heilsu, trivnað ella annað og sum hava uppiborið at fáa eina almenna viðurkenning fyri hetta". Viðlagt sum fylgiskjal 3 er uppskot til reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um, hvørt føroyska tignarmerkjaskipanin eigur at hava fleiri stig, sum vanligt er í mongum evropiskum skipanum, ella eitt stig. Tað er grundleggjandi fortreyt, sambært viðmerkingunum til løgtingssamtyktina, at føroyska skipanin ikki skal byggja á automatikk, men á ítøkiliga og sjálvstøðuga meting av hvørjum einstøkum avriki. Ein skipan við fleiri stigum hongur saman við siðvenjuni um hierarkiskan automatikk, har persónar í ávísum embætum ella støðum í samfelagnum fáa handað eitt ávíst stig av tignarmerkinum, sum síðan kann uppstigast. Tískil metir nevndin, at ein skipan við einum stigi heldur seg til meginreglurnar í føroysku skipanini um at byggja á ítøkiliga meting og tryggjar, at munur ikki verður gjørdur millum tey, sum fáa tignarmerkið. Løgmaður skal tó hava møguleikan at taka upp aftur spurningin um eina stigaskipan, um umstøður og atlit tala fyri tí.

## Nevndin mælir til:

- At ein føroysk tignarmerkjaskipan ikki er ein ordanarskipan, men byggir á íblástur frá skipanarligu meginreglunum hjá bæði ordanum og medaljum.
- At skipanin byggir á tann fólkaræðisliga virðis- og siðaarv, sum Føroyar sum land, samfelag og tjóð eru sprotnar úr, byggja á og framhaldandi vilja byggja á.
- At skipanin verður tillagað til nútíðarsamfelagið, og at bygnaðurin verður kjølfestur í galdandi samfelagsskipanum uttan at sleppa tí grundvølli, sum tignarmerkir byggja á.
- At Føroyar gera eitt tignarmerki, sum formliga hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum, og sum kann berast saman við øðrum tignarmerkjum.
- At ein føroysk tignarmerkjaskipan ikki er automatisk, men grundað á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni.

- At ein sjálvstøðug og politiskt óheft tignarmerkjanevnd verður sett, sum fær til uppgávu at taka ímóti øllum uppskotum um persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerkið.
- At nevndin metir um innkomin uppskot, kann sjálv koma við uppskotum og ger eitt samt tilmæli til løgmann at taka endaliga støðu til. Nevndarlimir kunnu ikki skjóta upp seg sjálvan ella aðrar sitandi nevndarlimir.
- At heiðursverd avrik verða mett sum nakað, ið fer út um tað, sum vanliga kann væntast av einum persóni í ávísum leikluti ella ávísum samanhangi í samfelagnum, sama hvør viðkomandi persónur er.
- At heiðursverd avrik kunnu vera einstøk avrik ella lívsverk yvir langt tíðarskeið, sum verða framd í øllum pørtum av samfelagnum, og sum leggja eftir seg munagott og varandi gagn fyri samfelagið og menniskjað.
- At ein føroysk tignarmerkjaskipan hevur eitt stig.
- At tignarmerkjanevndin virkar sambært uppskoti um reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar í fylgiskjali 3.

## 3.3 Tignarmerkjaskipanin og útlendingar

Føroyska tignarmerkið skal kunna handast persónum í Føroyum og uttanlands. Í hesum sambandi eigur skipanin at leggja upp fyri politiska sambandinum hjá Føroyum við umheimin. Tað eigur tískil at vera møguligt hjá løgmanni at handa umboðum fyri ríkir, lond og millumtjóða felagsskapir tignarmerki, tá ið tað kann gagna og verja nationalu áhugamál Føroya og styrkja diplomatiska sambandið við umheimin. Í øðrum londum verða tignarmerkir vanliga givin í sambandi við almennar vitjanir av ríkisovastum, og sendifólk kunnu fáa handað tignarmerki, eins og høgtstandandi umboð fyri millumtjóða felagsskapir. Hetta eru sokallaðar protokollerar ella diplomatiskar handanir. Hesar handanir byggja ikki á ítøkiliga meting av persónligum avrikum hjá útlendingum, men eru knýttar at umboðandi embætinum hjá viðkomandi og snúgva seg um sínámillum viðurkennandi diplomatisk viðurskifti millum lond. Tá ið talan er um slíkar handanir, heldur nevndin, at føroyska skipanin somuleiðis eigur at halda seg til galdandi diplomatiskar siðvenjur um protokollerar handanir av tignarmerkjum. Á hesum øki leggur skipanin upp til partvísan automatikk, eins og galdandi er í norðurlendsku ordanarskipanunum. Norðurlendsku skipanirnar hava tó fleiri møguleikar, av tí at tær eru samansettar av ymsum stigvísum ordanum og medaljum til ymisk endamál, har ávísar ordanir ella stig í ordanini eru ætlað ríkisovastum, statsligum umboðum og útlendingum annars.

Í kongligu skipanunum er tað vanliga kongur sjálvur, sum kann taka avgerð um handanir til limir í kongshúsinum og ríkisovastar. Danska skipanin hevur elefantordanina, sum er ætlað ríkisovastum. Í Noregi tekur kongur avgerð, tá ið hægsta stig í St. Olavsordanini skal handast, og tá ið útlendingar skulu fáa eina ordan. Noreg hevur Fortjenestordanina, sum er ætlað útlendingum, og hevur eitt serligt ordanarráð fyri hesa ordan, sum protokollstjórin í norska uttanríkisráðnum situr í, og sum norska uttanríkisráðið veitir skrivstovutænastu til.

Svøríki hevur Seramfimerordanina, sum er ætlað útlendskum ríkisovastum ella javnsettum persónum. Í Svøríki koma instillingar til protokollerar handanir frá Regeringskansliet, umvegis svenska uttanríkisráðið. Í íslendsku skipanini er tað forseti Íslands, sum tekur avgerð um protokollerar handanir í samráð við uttanríkisráðið. Sum heild eru tað uttanríkisráðini í londunum, sum á ymsan hátt eru knýtt at protokollerum handanum og handanum til útlendingar. Ein nærri lýsing av norðurlendsku skipanunum sæst í fylgiskjali 4.

Nevndin heldur, at ein partvísur protokollerur automatikkur ikki skal virka óheft av tignarmerkjanevndini. Øll uppskot um bæði føroyskar borgarar og útlendingar skulu viðgerast av tignarmerkjanevndini, men tignarmerkjanevndin eigur ikki at taka stig til sjálv at koma við tilmælum til løgmann um protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar. Slík stig eiga at verða tikin av fyrisitingini hjá landsstýrinum, av tí at slíkar handanir eru beinleiðis knýttar at politiska sambandi Føroya við umheimin og áhugamálum Føroya í hesum sambandi. Tískil er tað føroyska Uttanríkistænastan, sum eigur at koma við tilmæli til tignarmerkjanevndina, tá ið talan er um allar protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar. Tá ið talan er um handanir til útlendingar, sum ikki formliga umboða ein stat, land ella millumtjóða felagsskap, eigur tignarmerkjanevndin at ráðføra seg við Uttanríkistænastuna, áðrenn tilmæli verður givið løgmanni, av tí at tað ikki kann útilokast, at slíkar handanir eisini hava uttanríkispolitiskan týdning.

### Nevndin mælir til:

- At eitt føroyskt tignarmerki skal kunna handast persónum búsitandi í Føroyum og uttanlands.
- At føroyska tignarmerkjaskipanin heldur seg til galdandi siðvenjur, tá ið talan er um sínámillum viðurkenning millum lond og protokollerar handanir av tignarmerkjum.
- At føroyska Uttanríkistænastan kemur við tilmæli til tignarmerkjanevndina, tá ið tað snýr seg um allar protokollerar handanir til útlendingar.
- At tignarmerkjanevndin ráðførir seg við Uttanríkistænastuna, áðrenn tilmæli verður givið løgmanni, tá ið talan er um handanir til aðrar útlendingar.

## 3.4 Føroyska tignarmerkjaskipanin og handan

Føroyska tignarmerkið verður hægsta og tignarligasta viðurkenning, ið fevnir um alt samfelagið, og tað verður mett rímiligt og neyðugt, at landið stýrir síni egnu skipan. Løgmaður eigur at ráða yvir føroysku tignarmerkjaskipanini og at vera verji hennara. Løgmaður er stjórnarleiðari og umboðar samstundis eisini Føroyar og føroyska fólkið heima og úti. Harumframt verður diplomati stýrt frá útinnandi valdinum, og løgmaður tekur ímóti ríkisovastum og stjórnarleiðarum, tá ið teir koma til Føroya. Hetta hevur týdning, tá ið talan er um at geva útlendingum føroyska tignarmerkið. Løgmaður eigur at virka fyri at verja trúvirðið í skipanini og álitið á hana.

Av tí at løgmaður ræður yvir tignarmerkjaskipanini, er tað løgmaður, sum tilnevnir teir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerki. Løgmaður tekur endaliga støðu til, hvør skal fáa tignarmerki, og ger tað við støði í tilmæli, sum hann fær frá tignarmerkjanevndini.

Løgmaður handar, sum útgangsstøði, tignarmerkini í Føroyum. Skipanin eigur at leggja upp fyri, at møguligt eisini verður at handa tignarmerki uttanlands. Ber ikki til hjá løgmanni at handa tignarmerki, kann hann útveita handanina til varaløgmann ella tað landsstýrisfólk, sum er næst í røðini. Ber ikki til hjá løgmanni at handa uttanlands, kann hann útveita handanina til landsstýrisfólkið í uttanríkismálum ella viðkomandi føroyskt sendifólk á staðnum.

Tað er hóskandi, at handanin sum útgangsstøði fer fram í søguligu bygningunum í Tinganesi, sum løgmaður ræður yvir. Skipanin eigur samstundis at leggja upp fyri, at tignarmerkir kunnu handast á øðrum hóskandi staði í Føroyum ella uttanlands, um umstøður og atlit tala fyri tí.

Fyri at varðveita skipanina sum serliga viðurkennandi hevur tað týdning, at tað ikki verða handað ov nógv tignarmerkir. Nevndin heldur, at miðast skal eftir at handa ikki fleiri enn trý tignarmerkir árliga, tó við tí fyrivarni, at talið kann verða størri ella minni, alt eftir um grundarlag er fyri at heiðra fleiri ella færri.

Tað hevur týdning at hava ein fastan hátíðardag fyri handan, samstundis sum møguleiki skal vera fyri at handa aðrar dagsetingar. Á ólavsøku hendir nógv, sum upptekur bæði løgmann, fólk og miðlar. Løgmaður er upptikin við setan, ólavsøkurøðu og kirkjugongd. Fólk hava ofta egnar siðvenjur, og nógv eru burturstødd. Miðlarnir eru upptiknir av at varpa ljós á ólavsøkuna.

Flaggdagurin kundi verið møguligur handanardagur. Spurningurin er tó, um løgmanni ber til at hava flaggdagin sum fastan handanardag, av tí at løgmaður vanliga heldur flaggdagsrøðu ymsastaðni í Føroyum ella uttanlands.

Nevndin metir tí, at 1. januar er ein hóskandi dagur. Hesin dagur er súmbolskur við at vera fyrsti dagurin í nýggja árinum. Vanliga er hesin dagur sera friðarligur bæði hjá løgmanni, fólki flest og miðlum. Hetta kundi givið rúm fyri eini hátíðarligari handan og móttøku aftaná, sum sømir seg at fyriskipa fyri teimum persónum, sum fáa handað tignarmerkið. Tað hevði verið hóskandi, at tey, sum fáa handað tignarmerkið, kunnu taka næstringar við, at løgtingsforfólkið og tignarmerkjanevndin eru hjástødd, og at miðlarnir fáa høvi at vera við til part av tiltakinum.

Saman við tignarmerkinum eigur móttakarin at fáa eitt heiðursbræv, sum er undirritað av løgmanni. Heiðursbrævið váttar heiðurin og hevur til endamáls at staðfesta tann serliga týdning, sum liggur í heiðrinum, og at lýsa í stuttum, hví viðkomandi hevur gjørt seg verdan til at fáa Tignarmerki Føroya. Soleiðis verður tryggjað, at hvør handan er vælgrundað,

og at sjálvur heiðurin verður knýttur beinleiðis at avrikum móttakarans. Tað eigur at verða almannakunngjørt við stuttari grundgeving, tá ið tignarmerkir eru latin.

Tignarmerkini eiga at vera ogn landsins og eiga ikki at latast persónum til ognar. Harumframt verða tignarmerkini latin einstøkum persónum fyri ítøkilig avrik og eiga ikki at kunna arvast. Tað merkir, at tignarmerkið skal latast landinum aftur við deyða tignarberans.

### Nevndin mælir til:

- At løgmaður ræður yvir føroysku tignarmerkjaskipanini og er verji hennara.
- At løgmaður tilnevnir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerki, og tekur endaliga støðu við støði í tilmæli frá tignarmerkjanevndini.
- At løgmaður handar tignarmerkini í Føroyum. Berst honum frá, handar varaløgmaður ella tað landsstýrisfólk, sum er næst í røðini. Berst løgmanni frá at handa tignarmerki uttanlands, handar landsstýrisfólkið í uttanríkismálum ella viðkomandi føroyskt sendifólk á staðnum.
- At tignarmerkini verða handað í Tinganesi. Tala umstøður og atlit fyri tí, kunnu tignarmerkir handast aðrastaðni í Føroyum ella uttanlands.
- At miðast skal eftir ikki at handa fleiri enn trý tignarmerkir árliga.
- At tignarmerkir verða handað árliga tann 1. januar. Frávik kunnu gerast frá hesum.
- At móttøka verður skipað í sambandi við handanina við luttøku av: Løgmanni, teimum, sum fáa handað tignarmerkið, løgtingsforfólkinum, tignarmerkjanevndini, næstringum og fjølmiðlum.
- At saman við Tignarmerki Føroya fær móttakarin eitt heiðursbræv, sum inniheldur grundgevingina fyri handanini, og sum løgmaður undirritar.
- At tað eftir handanina verður almannakunngjørt, hvør hevur fingið tignarmerki, við stuttari grundgeving.
- At tignarmerkið er ogn landsins og verður latið landinum aftur við deyða tignarberans.

## 3.5 Tignarmerkjanevndin

Nevndin metir, at uppgávan hjá tignarmerkjanevndini eigur at vera í sínum virki at stuðla løgmanni í at verja trúvirðið í skipanini og álitið á hana. Álitið á nevndina verður tongt at nevndarsamansetingini og hennara tilmælum, at tey eru gjøgnumhugsað og kjølfest í grundleggjandi virðunum í føroyska samfelagnum. Nevndin eigur at verða sett saman av kvinnum og monnum, sum saman umboða alt føroyska samfelagið, sum eru politiskt óheft, saklig og umboða ongan annan enn seg sjálvan. Nevndarlimir eiga ikki at sita í Løgtingi, landsstýri ella kommunustýri. Tey eiga at hava hollar lívsroyndir, stórt trúvirði, vera alment vird og hava innlit í, hvat rørist ymsastaðni í føroyska samfelagnum og millum fólk. Tá ið skipanin hevur virkað í nøkur ár, eigur tað at tala fyri at koma í nevndina, at persónur hevur fingið handað tignarmerkið. Eru

fólkini í nevndini tignarberar, er tað ein álitisváttan og viðurkenning frá landinum. Hesi fólk verða sostatt mett at vera skikkað til at sita í tignarmerkjanevndini. Í fyrstuni verður tað avmarkað, hvussu nógvir nevndarlimir eru tignarberar, men við tíðini veksur skarin.

Nevndararbeiðið eigur at vera ólønt heiðursstarv, sum ikki er grundað á peningalig áhugamál. Limirnir eiga tó sambært galdandi reglum at fáa endurrindað útreiðslur, sum standast av fundum og øðrum virksemi í sambandi við arbeiði nevndarinnar.

Føroyska samfelagið er lítið, og nevndin heldur, at tað skulu ikki sita ov nógv fólk í nevndini. Íslendska ordanarnevndin telur seks limir íroknað ordanarritaran. Tað er hóskandi fyri føroysku tignarmerkjanevndina at hava fýra nevndarlimir, tvey mannfólk og tvey konufólk, umframt ein tignarritara, sum er løgmansstjórin. Nevndin metir, at limirnir í tignarmerkjanevndini eiga at sita í fýra ár við møguleika fyri at verða afturvaldir í tvey ár afturat. Eitt fýra ára skeið er valt fyri at hava vitanarframhald og støðugar arbeiðsumstøður í nevndini. Hildið verður av somu grund, at ikki øll nevndin skal skiftast út samstundis, men í mesta lagi tveir limir samstundis. Í fyrstu tignarmerkjanevndini kann hetta gerast soleiðis, at allir nevndarlimirnir sita í fýra ár, og at síðan verða ein ella tveir av limunum skiftir út. Hetta kundi verið gjørt við lutakasti, ella at tignarmerkjanevndin sjálv skipar seg hesum viðvíkjandi.

Valið av nevndarlimum eigur ikki at verða býtt út til ávísar geirar og áhugapartar í samfelagnum at taka støðu til, av tí at tey í sínum virki natúrliga røkja tey áhugamál, sum teimum er álagt at umboða. Harumframt heldur nevndin tað vera trupult at velja út ávísar partar fram um aðrar, við tað at tignarmerkjaskipanin eigur at verða grundað á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni. Løgmaður eigur at góðkenna og taka endaliga støðu til tilmælini um nevndarlimir, men hesi tilmæli eiga ikki at koma frá honum sjálvum. Spurningurin er eisini, hvør skal útnevna fyrstu tignarmerkjanevndina, og hvør ið síðan skal taka yvir. Hóskandi er, at formansskapurin í Løgtinginum kemur við einum samdum tilmæli til fyrstu tignarmerkjanevndina at leggja fyri løgmann til endaliga støðutakan. Løgtingið umboðar alt Føroya fólk, og formansskapurin er sambært Tingskipanini hitt hægra fyriskipaða stýrið í Løgtinginum og umboðar tingið úteftir. Tilmælið eigur at innihalda ein óraðfestan lista við fleiri fólkum, sum mett verða skikkað til starvið, soleiðis at talan er um fleiri valmøguleikar. Á listanum eiga at standa minst tvífalt so mong fólk, sum løgmaður skal tilnevna.

Tá ið fyrsta tignarmerkjanevndin er sett, eigur hon eftir tað sjálv at koma við einum samdum tilmæli til løgmann um nýggjar nevndarlimir eftir somu meginreglum sum formansskapur Løgtingsins galdandi fyri tilmælið til fyrstu tignarmerkjanevndina. Grundin til, at tignarmerkjanevndin sjálv skal tilmæla nýggjar limir, er, at tað gevur rúm fyri, at tilmæli eru politiskt óheft, so at tey hvørki koma frá Løgtingi, Landsstýri ella útvaldum geirum og áhugapørtum í samfelagnum. Harumframt veit nevndin, hvat krevst av arbeiðinum, og uppbyggir sær vitan um føroyska samfelagið og persónar, sum hóska og eru skikkaðir til hetta starv. Limir í nevndini eiga at verða sitandi, til løgmaður hevur tilnevnt nýggjar nevndarlimir, og skipanin eigur ikki at leggja upp fyri varalimum. Væntað verður, at tignarmerkjanevndin

fær persónliga og viðkvæma vitan um nógv fólk í samfelagnum, og tí skulu ikki fleiri fólk enn neyðugt fáa atgongd til nevndina.

Nevndin hevur fund nakrar ferðir um árið. Fyri at nevndin fær virkað væl og so óheft sum møguligt, eigur arbeiðið ikki at verða skipað ov stirvið frá byrjan. Nevndin fer sjálv at gera sær sínar royndir um skynsaman og hóskandi arbeiðshátt og eigur at kunna tillaga tær. Tískil verður lagt upp til, at nevndin sjálv skipar seg við forfólki og varaforfólki og ásetur sína egnu fundarskipan. Í fundarskipanini eigur at verða lagt upp fyri, at nevndin skal kunna virka skjótt, um neyðugt er við skjótum tilmæli til løgmann.

### Nevndin mælir til:

- At ábyrgdin hjá tignarmerkjanevndini skal vera í sínum virki at stuðla løgmanni í at verja trúvirðið í tignarmerkjaskipanini og álitið á hana.
- At nevndin eigur at verða sett saman av kvinnum og monnum, sum saman umboða alt tað føroyska samfelagið, sum eru politiskt óheft, saklig og umboða ongan annan enn seg sjálv.
- At limir í tignarmerkjanevndini ikki sita í Løgtingi, Landsstýri ella kommunustýri.
- At limirnir í tignarmerkjanevndini hava hollar lívsroyndir, stórt trúvirði, eru alment vird og hava innlit í, hvat rørist ymsastaðni í føroyska samfelagnum og millum fólk.
- At eftir nøkur ár, eigur tað at tala fyri at koma í nevndina, at persónur er tignarberi.
- At nevndararbeiðið er ólønt heiðursstarv.
- At tignarmerkjanevndin telur fýra limir umframt ein tignarritara.
- At nevndarlimir sita í fýra ár og kunnu endurveljast til tvey ár afturat.
- At øll nevndin ikki verður skift út samstundis, men at ein ella tveir limir verða skiftir út í senn.
- At formansskapur Løgtingsins leggur fram eitt samt tilmæli við lista yvir persónar, sum mettir verða skikkaðir til fyrstu tignarmerkjanevndina fyri løgmann til endaliga støðutakan.
- At tignarmerkjanevndin síðan, tá ið fyrstu nevndarlimirnir verða skiftir út, leggur fram eitt samt tilmæli við lista yvir møguligar nýggjar nevndarlimir fyri løgmann til endaliga støðutakan.
- At tignarmerkjanevndin skipar seg sjálv við forfólki og varaforfólki og ger sína egnu fundarskipan, har lagt verður upp fyri, at nevndin skal kunna virka skjótt.

## 3.6 Fyrisitingarlig fyrilit

Tignarmerkjaskipanin verður landsins hægsti almenni heiður og byggir á álitið um, at hon verður handfarin við varsemi og virðing. Tí tað er trupult at fáa eina álítandi tignarmerkjaskipan við ítøkiligum metingum av persónum at virka, um almenningurin samstundis skal kunna hava innlit í hesar metingar, áðrenn og eftir at persónar hava fingið handað tignar-

merki. Tað verður tískil mælt til ávíst afturhaldni og virðing fyri arbeiðinum hjá nevndini, so trúvirðið í skipanini og álitið á hana verða varðveitt.

Arbeiðið og málsviðgerðin í tignarmerkjanevndini fara fram sambært teimum almennu fyrisitingarligu meginreglunum, men nevndin heldur tað vera neyðugt, at skipanin, har tað ber til, tryggjar, at uppskot kunnu verða viðgjørd óheft og í trúnaði, og at nevndarviðgerðin verjir bæði uppskotssetarar og teir persónar, sum verða skotnir upp til tignarmerki. Tískil mælir nevndin til, at viðgerðin av persónsupplýsingum og innlit í arbeiðið hjá nevndini í praksis verður tulkað avmarkandi til fyrimunar fyri uppskotssetarar og tey fólk, sum verða skotin upp, tilmæld og tilnevnd at fáa tignarmerki.

### Nevndin mælir til:

- At afturhaldni og virðing verður víst arbeiðinum hjá tignarmerkjanevndini.
- At skipanin tryggjar, at uppskot kunnu verða viðgjørd óheft og í trúnaði, og at bæði uppskotssetarar og persónar, sum verða skotnir upp, tilmældir og tilnevndir, eru vardir.
- At viðgerðin av persónsupplýsingum og innlit í arbeiði nevndarinnar í praksis verður tulkað avmarkandi.

## 3.7 Uppgávur tignarritarans

Nevndin metir, at ritarastarvið í tignarmerkjanevndini ikki kann metast við vanligt fyrisitingarligt fúlltrúastarv í einum aðalráði. Tignarmerkjanevndin fer at arbeiða í tí stilla við trúnaðarupplýsingum og persónum. Tað hevur týdning, at so fá sum møguligt hava atgongd til arbeiðið hjá nevndini. Hetta hevur við sær, at tignarritarin má hava heimildir, so at viðkomandi ikki má fara ígjøgnum fleiri leiðsluløg fyri at kunna fremja sítt arbeiði. Ritarin fer at samskifta beinleiðis við løgmann í øllum málum, sum viðvíkja tignarmerkjanevndini. Av tí at mælt verður til, at løgmaður hevur ræði á skipanini, eigur løgmansstjórin at virka sum tignarritari. Til samanberingar kann nevnast, at í Íslandi er tað stjórin á forsetaskrivstovuni, sum er ritari í ordanarnevndini.

Uppgávurnar hjá tignarritaranum eiga at vera hesar: Kalla til fundar, samskipa alt samskiftið við løgmann, tignarmerkjanevndina og tilmældar persónar, hava um hendi øll tilmæli og øll formlig skjøl í sambandi við tilmæli og handanir, hava í varðveitslu tignarmerkini og skipa fyri hátíðarhaldi í sambandi við tignarmerkjahandan.

Sostatt verður tað Løgmansskrivstovan, sum verður karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini og allari fyrisiting í hesum sambandi. Løgmansskrivstovan ber kostnaðin av útreiðslunum, sum tignarmerkjaskipanin hevur við sær.

### Nevndin mælir til:

- At løgmansstjórin verður tignarritari í tignarmerkjanevndini.
- At uppgávur tignarritarans eru hesar: Kalla til fundar, samskipa alt samskiftið við løgmann, tignarmerkjanevndina og tilmældar persónar, hava um hendi øll tilmæli og fáa til vega øll formlig skjøl, hava í varðveitslu tignarmerkini og skipa fyri hátíðarhaldi í sambandi við tignarmerkjahandan.
- At Løgmansskrivstovan verður karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini og allari fyrisiting, sum fylgir við tignarmerkjaskipanini.
- At Løgmansskrivstovan ber kostnaðin av teimum útreiðslum, sum standast av at hava eina tignarmerkjaskipan.

## 3.8 Útilokan frá at fáa tignarmerkið

Tá ið talan er um at heiðra persónar við landsins hægsta tignarmerki fyri fyrimyndarliga merkisvert og serstakt avrik, eigur tað at vera ein treyt, at viðkomandi ikki skal hava framt ella vera dømdur fyri nakað álvarsamt lógarbrot. Verður fyrilit ikki tikið fyri lógarbroti, er tað skjótt, at almenningurin missir álitið á skipanini og metingarevnunum hjá tignarmerkjanevndini og løgmanni. Í Danmark verða tilmældir persónar bidnir um loyvi til at eftirkanna teir í brotsverkskrásetingini hjá løgregluni. Í Íslandi og Grønlandi er ikki ynskiligt at spyrja persónar, um til ber at kanna teir hjá løgregluni. Persónar verða tó ikki tilmældir, um viðkomandi er dømdur fyri lógarbrot, ella illgruni er um óreiðiligan atburð. Norðurlendsku skipanirnar leggja eisini upp fyri, at tignarmerki verður kravt aftur frá tignarbera, um viðkomandi seinni verður dømdur fyri álvarsamt lógarbrot. Nevndin heldur, at í sambandi við at verja persónsupplýsingar hevur eitt krav um at biðja um loyvi til at leita fram upplýsingar um møgulig lógarbrot við sær, at óneyðug viðkvom og privat vitan fæst um viðkomandi. Vísir tað seg aftaná, at tignarberi verður dømdur fyri álvarsamt lógarbrot ella ber seg at á ein hátt, ið gongur ímóti teimum virðum, sum heiðurin umboðar, skal skipanin gera tað møguligt, at løgmaður kann taka tignarmerkið aftur frá tignarbera. Hetta eigur at verða gjørt eftir at hava hoyrt tignarmerkjanevndina.

### Nevndin mælir til:

- At persónar, sum eru dømdir fyri álvarsamt lógarbrot ella á annan hátt fremja virksemi, ið gongur ímóti teimum virðum, sum heiðurin umboðar, ikki fáa tignarmerkið.
- At løgmaður eftir at hava hoyrt tignarmerkjanevndina kann taka tignarmerkið aftur frá tignarbera, um viðkomandi fremur virksemi, ið hevði útilokað tignarmerki.

4. kapittul

# Útsjónd og framleiðsla

## 4.1 Sniðgevingartilgongdin

Nevndin hevur nýtt nógva orku til at umrøða og viðgera, hvørji innsignir eitt komandi føroyskt tignarmerki skal hava, og hvussu útsjóndin í hesum sambandi skal vera. Fundir hava verið við eina breiða fjøld av fakfólki innan fyri list, arkitektur, gull- og silvurhandverk, geologi og grafiskt snið fyri at tryggja væl grundaða tilgongd til myndevni, súmbolikk, form, litir og tilfar. Dentur hevur verið lagdur á, at innsignini á tignarmerkinum skulu fevna um eitt serstakt eyðkenni, ið greitt skilur tað frá øðrum tignarmerkjum. Hetta skal koma til sjóndar í sniði, litum, søguligum og mentanarligum tilvísingum og í tilfari, ið verður nýtt. Í hesum sambandi skipaði nevndin í 2024 fyri hugskotskapping, har tólv luttakarar, seks kvinnur og seks menn, vóru boðin at luttaka. Tey luttakandi skuldu gera eina skitsu til eitt bringuprýði, sum lýsti útsjónd, hevði uppskot um heiti og innihelt eina stutta frágreiðing um útsjóndina og heitið. Tíggju teirra tóku av og sendu inn uppskot til kappingina.

Nevndin setti eina dómsnevnd við seks limum at meta um innkomnu uppskotini og at tilskila sær rættin til einki av innkomnu uppskotunum at velja. Í dómsnevndini sótu løgmaður, løgtingsforkvinnan, ein gullsmiður, eitt umboð fyri Tjóðsavnið, eitt umboð fyri Listasavn Føroya og forkvinnan í nevndini. Luttakararnir í hugskotskappingini vóru dulnevndir fyri dómsnevndini, og allir fingu somu samsýning fyri síni uppskot. Dómsnevndin valdi út eitt sniðuppskot, tað var uppskotið, sum listamaðurin Edward Fuglø hevði teknað. Nevndin mælir til, at hetta sniðuppskot verður Tignarmerki Føroya. Listamaðurin sjálvur lýsir sniðuppskotið við teksti og tekningum í næsta parti, „Innsignir á Tignarmerki Føroya".

Sniðuppskotið hevur Edward Fuglø sjálvur gjørt, og tað er eitt upprunaligt verk. Nevndin ger vart við, at hon eftir avtalu við listamannin hevur fingið loyvi til at vísa og nýta hansara upprunaliga sniðuppskot í hesum áliti. Semja er um, at nýtslan er avmarkað til tað arbeiðið, sum er neyðugt hjá nevndini fyri at skriva hetta álit, tað arbeiðið, sum er neyðugt hjá Løgmansskrivstovuni fyri at fyrireika at leggja fyri Løgtingið eitt møguligt løgtingslógaruppskot um Tignarmerkið Føroya, og tað arbeiðið, sum er neyðugt hjá Løgtinginum fyri at kunna viðgera løgtingslógaruppskotið í Løgtinginum. Almannakunngerð í hesum sambandi merkir ikki, at sniðuppskotið frítt kann gerast tókt fyri almenninginum, nýtast, avritast ella á

annan hátt gagnnýtast av triðjaparti til onnur endamál enn tey, sum eru nevnd í hesum áliti og tilhoyrandi fylgiskjølum. Sniðuppskotið er vart sambært galdandi upphavsrættarligum reglum umframt møguligum viðkomandi reglum um sniðgevingarrætt. Upphavsrætturin til sniðuppskotið er hjá listamanninum Edward Fuglø. Nýtsla ella gagnnýtsla av sniðuppskotinum krevur frammanundan samtykki frá upphavsrættarhavaranum, uttan so, at annað er avtalað við upphavsrættarfólkið. Skal ein føroysk tignarmerkjaskipan setast í verk, verður neyðugt hjá landinum at gera eina avtalu við listamannin um upphavsrættin. Ein slík avtala er uttan fyri arbeiðssetning nevndarinnar. Nevndin metir tó, at avtalan eigur at fevna um, at upphavsrætturin heilt ella lutvíst verður avhendaður til landið.

Fyrivarni skal sum heild takast fyri, at útsjóndin á tignarmerkinum kann broytast í framleiðslutilgongdini og verður sannlíkt ikki heilt í samsvari við upprunatekningarnar sum vístar í hesum áliti. Nevndin metir, at tað er uttanfyri arbeiðssetning nevndarinnar at framleiða eitt uppskot til eitt ítøkiligt tignarmerki. Slík framleiðsla eigur at setast í verk av Løgmansskrivstovuni. Av tí at útsjóndin á tignarmerkinum sannlíkt verður tillagað nakað undir framleiðsluni, heldur nevndin, at løgmaður eigur at fáa heimild til við kunngerð at staðfesta endaligu innsignir á tignarmerkinum. Tá ið tignarmerkið er gjørt, skulu øll innsignir vera í samsvari við tær nágreinaðu tekningar og lýsingar, sum løgmaður eigur at góðkenna. Tað tryggjar smidleika, har tað er neyðugt, fyri endaligu sniðgevingina og framleiðsluna, samstundis sum hildið verður fast um grundleggjandi listarliga konseptið við Tignarmerki Føroya, tá ið ræður um hugskot, útsjónd, sereyðkenni, tilfar og súmbolskan týdning. Verða innsignini á tignarmerkinum fastløgd við lóg, áðrenn endaliga produktið er til taks, bindur lógin útsjóndina til eitt fyribilssnið. Tað kann forða fyri neyðugum broytingum í framleiðslutilgongdini.

### Nevndin mælir til:

- At Tignarmerki Føroya skal hava tey innsignir og síggja út sum lýst í teksti og upprunaligu tekningum eftir listamannin Edward Fuglø í hesum áliti við teimum tillagingum, ið kunnu verða neyðugar í sambandi við framleiðsluna.
- At løgmaður fær heimild til við kunngerð at staðfesta endaligu innsignir á Tignarmerki Føroya.
- At tá ið tignarmerkið er gjørt, skulu øll innsignir verða í samsvari við tær nágreinaðu tekningar og lýsingar, sum løgmaður hevur góðkent.

## 4.2 Innsignir á Tignarmerki Føroya

Listamaðurin Edward Fuglø hevur teknað sniðuppskotið til Tignarmerki Føroya og greiðir í fylgjandi teksti frá um tey innsignir, ið saman mynda merkið:

# Tignarmerki Føroya

Tignarmerki Føroya er sett saman av trimum pørtum:

1. Upphangi umboðandi landsins ovasta myndugleika, Føroya Løgting og Landsstýri, sum letur Tignarmerkið.

   Hetta sýnir veðrin úr gamla føroyska skjaldrarmerkinum. Hann er formstoyptur úr silvuri og lagdur við gulli. Á veðrarbakið er fest lítið eyga sum ein skjøldur úr silvuri og lagt við gulli. Hesin skjøldur er festur í dimmreytt tignarband úr silki. Veðrurin stendur á eini syll, eisini úr silvuri og løgd við gulli.

2. Merki umboðandi fagnaðin og landspartarnar.

   Tað sýnir eina stjørnu, sum er fest niður úr syllini. Stjørnan er føroyska bindimynstrið Stóra Stjørna. Stjørnan er átta rútamyndaðir ferhyrningar úr silvuri, lagdir við gulli. Í ferhyrningarnar eru tillagaðar flagglittar strípur úr emalju málaðar, reyðar, bláar og ráhvítar. Innarlaga í stjørnuni er sigurskransur av seks formstoyptum flúgvandi tjøldrum, tjóðfuglinum, úr silvuri og lagdur við gulli, umboðandi tey seks landaøkini í Føroyum.

3. Rundari smámynd, umboðandi móttakaran.

   Tjóðarsúmbolini stjørnan, veðrurin og tjøldrini eru týðilig og sjónlig, men runda myndin í tignarmerkinum er ein smámynd. Ein evarska lítil forvitnislig mynd, ið letur seg kanna og kann leggjast undir lupp. Íblásturin til hesa lítlu mynd er Seyðabrævið frá 1298, ið er Føroya elsta lógarskjal.

   Yvirskipað umboðar smámyndin listina. Hon er úr ráhvítum/hvítum postalíni við graveraðari/áprentaðari mynd og er sett í runda silvurrammu, sum er løgd við gulli.

   Hvørt tekstbrot í Seyðabrævinum byrjar við listprýddum bókstavi í gotiskum stíli, umgirdur við ornamentum og smálutum, sum siga sína egnu søgu. Við rótfesti í hesum er stavurin á smámyndini eitt dagført „F“, sum stutt og greitt stendur fyri Føroyar. Kring stavin eru ymisk dagførd súmbol flættað inn í miðaldarornamentikk, umboðandi vísindi, tøkni og mentan í dag. Tey vísa ymisk áhuga- og hjartamál hjá landsins borgarum.

4. Tignarmerki Føroya hevur somu útsjónd aftan og framman, tó við einum fráviki. Framsíðan vísir smámyndina, sum er nevnd omanfyri, og á baksíðuni stendur „Tignarmerki Føroya“ og árstal, tá ið Tignarmerki Føroya er stovnað.



Tekning 1
Uppskot til framsíðu á Tignarmerki Føroya




Tekning 2
Uppskot til baksíðu á Tignarmerki Føroya

(1) Bókstavurin sjálvur er reyður og settur saman av tveimum drekastevnum umboðandi siglandi tjóðina, bátasmíð og handverk. Bókstavurin er eisini ein greipa og umboðar fiskivinnuna.

(2) Fiskaeygað er sum eitt bundið eyga og myndar bindikynstur og sniðgeving. Á liðini sýnir bókstavurin eitt flogfar og er tá saman við stevnunum ímynd av samferðslu. Ornamentini við bláum stelkum og bløðum, sum grógva úr „F-inum, eru prýdd við súmbolum.

(3) Rúnin F sipar til forna mentan og skaldskap.

(4) Sóljan, tjóðarblóman, umboðar náttúru og umhvørvi.

(5) Eldru teknini, krossur, hjarta og akker, umboðandi trúgv, vón, og kærleika, mynda kirkju og kristnitrúgv.

(6) Tannhjólið ímyndar mekanikk og malandi samfelagshjól.

(7) Fibonacci snyrilin sýnir frymil fyri gylta sniðið, støddfrøði og onnur vísindi og sæst aftur ymsastaðni í skapanarverkinum, í stórum stjørnubreytum sum í lítlum kúvingum við sjóvarmálan.

(8) Atomið er grundleggjandi í evnafrøði.

(9) Nótin umboðar tónleik og sang.

(10) Paragraffteknið umboðar lógarverk, lóg og landaskil.

(11) Lítli træhesturin, føroysk barnaleika frá víkingatíð, umboðar barnið og tess uppaling, námsfrøði og skúlaverk.

(12) Arvastrongurin umboðar lívfrøði, læknavísindi og heilsuverk.

(13) PI-teknið er grundleggjandi í støddfrøði.

(14) Jarðarkúlan sýnir Føroyar í altjóða og talgilda heiminum, bóltin og ítróttina.

(15) Reyða eldtungan úr skjaldrarmerkinum myndar málið, munnborna mentan og skaldagávur umframt treytaleysa verju av landi og fólki við styrki og vísdómi.

Við hesum skal Tignarmerkið sýnast tignarligt, tíðarleyst og hugvekjandi.




Tekning 3

Smámynd við tølum til tekstin frá Edward Fuglø





Tekning 4

Uppskot til smámyndina í Tignarmerki Føroya




Tekning 5
Uppskot til Tignarmerki Føroya í stødd 1:1

## 4.3 Framleiðslan

Neyðugt verður at framleiða føroyska tignarmerkið uttanlands, av tí at tað í løtuni ikki ber til í Føroyum. Hetta samsvarar við siðvenju í grannalondum okkara, har bæði danski Riddarakrossurin og íslendska Falkaordanin verða framleitt heilt ella partvíst uttan fyri landamørkini. Nevndin hevur vent sær til fyritøkurnar í Danmark og Íslandi, sum arbeiða við donsku og íslendsku tignarmerkjunum, og sum nevndin hevur vitjað. Tað vísir seg, at donsk fyritøka sær seg føra fyri at framleiða tignarmerkið við øllum tilhoyri. Íslendska fyritøkan sá seg ikki føra fyri at vera partur av hesum arbeiði.

Hóast framleiðslan í fyrstu atløgu verður løgd uttanlands, heldur nevndin tað hava týdning, at føroyskir fakbólkar og fyritøkur verða tikin við í arbeiðið, har tað er gjørligt. Hetta kann geva grundarlag fyri, at øll framleiðslan av tignarmerkinum sum frá líður verður flutt til Føroya, um áhugi og førleikar eru til tess, og at tað í Føroyum er møguligt at bøta um føroyska tignarmerkið, um nú bandið dettur av, skøvur koma á, glasingin fer, eskjur brotna o.s.fr. Nevndin hevur vent sær til føroyska fyritøku fyri at fáa framleiðsluna kjølfesta í Føroyum, hóast sjálv framleiðslan ikki verður her heima. Fyritøkan er sinnað at samstarva við listamannin um framleiðsluna og at gera tað, sum til ber, í Føroyum.

### Nevndin mælir til:

- At føroysk fyritøka verður partur av framleiðslutilgongdini saman við listamanninum.
- At fyritøka, sum hevur royndir at framleiða tignarmerkir, fær til uppgávu at framleiða føroyska tignarmerkið saman við føroyskari fyritøku.

## 4.4 Framleiðslu- og fyrisitingarkostnaður

Kostnaðurin á eini føroyskari tignarmerkjaskipan er gjørdur út frá teirri meting, at talan er um at framleiða eitt tignarmerki úr dygdartilfari við stórum listarligum, mentanarligum og søguligum virði. Størsti framleiðslukostnaðurin verður í fyrstuni serliga í sambandi við at sniðgeva tignarmerkið klárt til framleiðslu og at gera serligan stoypiform. Fyrsta árið verður mælt til at framleiða eina avmarkaða nøgd av tignarmerkjum, sum tryggjar, at skipanin hevur hóskandi grundarlag fyri fyrstu handanunum. Tað verður ikki mett ráðiligt at framleiða ov nógv tignarmerkir í fyrstu atløgu, tí hugsast kann, at tillagingar verða í framleiðsluni. Tað skal sniðgevast og prentast heiðursbræv, sum fylgir við handanini. Harumframt skal gerast ein heimasíða, sum ger tað møguligt hjá fólki talgilt at lata inn uppskot um persónar. Eftir fyrsta framleiðsluárið minka útreiðslurnar væntandi, tí tignarmerkini eru gjørd klár til framleiðslu, nøkur eru framleidd og verða latin aftur við tíðini og síðan latin nýggjum móttakarum, og ein heimasíða er komin at virka.

Framleiðslan fevnir í fyrstuni um útreiðslur til at:

- sniðgeva og menna tignarmerkið listarliga.
- stoypa tignarmerkini við tilfari úr silvuri og gulli og at glasa tey við ymsum litum.
- framleiða og møguliga sniðgeva serligar eskjur og sniðgeva og prenta heiðursbræv.
- gera heimasíðu.

Tá ið skipanin er komin í gongd, verður talan um munandi minni útreiðslur, ið fevna um framleiðslu av einstøkum merkjum, viðlíkahaldi og tilhoyrandi fyrisiting. Tilsamans verður mett, at framleiðslukostnaðurin fyrsta árið kann liggja millum 300.000 og 500.000 kr., alt eftir, hvussu langa tíð tað tekur at koma til endaliga produktið við tignarmerkinum íroknað eskju og heiðursbræv, og hvussu nógv tignarmerkir verða framleidd. Eftir hetta kann væntast, at kostnaðurin verður á leið 50.000–70.000 kr. árliga fyrstu árini, um fleiri tignarmerkir skulu framleiðast, og síðan ein minni kostnaður, 50.000 kr. árliga, fyri viðlíkahald og einstakar framleiðslur eftir tørvi. Tað er torført at gera eina nágreinaða meting av samlaðu útreiðslunum, tí talan er um eina nýggja tilgongd og framleiðslu, har fleiri lið í arbeiðinum, eitt nú sniðgeving, framleiðsla og tilfarsval, ikki eru endaliga fastløgd enn og verða tað heldur ikki, fyrr enn eitt møguligt lógaruppskot um Tignarmerki Føroya er samtykt. Tað er tí neyðugt at rokna við ávísari óvissu í kostnaðarmetingunum í fyrstuni.

Fyrisitingin av skipanini verður løgd til Løgmansskrivstovuna, sum veitir skrivstovutænastu til tignarmerkjanevndina og røkir dagligu umsitingina. Arbeiðsorkan hjá Løgmansskrivstovuni kann væntast at vera mest í fyrstuni, tá ið skipanin verður bygd upp, serliga í sambandi við fyrstu handanirnar. Mett verður, at arbeiðsorka svarandi til umleið eitt fjórðings fulltíðarstarv kann verða neyðug tað fyrsta árið, og tørvurin fer síðani at minka, tá ið skipanin er fingin at virka. Nevndin metir, at samlaði kostnaðurin til framleiðslu og fyrisiting liggur á hóskandi og rímiligum stigi í mun til føroysku fyrisitingina og týdningin av at seta á stovn eina føroyska tignarmerkjaskipan.

## Nevndin mælir til:

- At framleiðslan av Tignarmerki Føroya verður løgd til rættis við denti á dygdarframleiðslu við stórum listarligum, mentanarligum og søguligum virði.
- At fyrisitingin av skipanini verður løgd til Løgmansskrivstovuna, og at neyðug fyrisitingarlig og fíggjarlig orka verður sett av til uppgávuna.
- At útreiðslurnar til framleiðslu og fyrisiting verða hildnar á einum stigi, sum svarar til týdningin av at seta á stovn føroyska tignarmerkjaskipan.

# Fylgiskjøl

# Fylgiskjal 1:

# Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin og Álit frá Mentanarnevndini

**Bjørt Samuelsen**
**Ruth Vang**
**Kristin Michelsen**
**Helgi Abrahamsen**
**Christian Andreasen**
**Bill Justinussen**
**løgtingsmenn**

Løgtingið

**Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um føroyskt heiðurstekin at lata persónum fyri merkisvert arbeiði ella gerning, ið gagnar landi og fólki og tænir Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Føroyar eiga at hava eitt føroyskt heiðurstekin, eina ærumedalju - almennan heiður - ið kann latast kvinnum og monnum, sum á serstakan, dyggan og rósuppibornan hátt tæna landi og fólki. Persónar, sum uttan mun til starvsøki ella samfelagsstætt gera nakað serstakt og merkisvert í virkni og verki sínum í samfelagnum. Persónar, sum ganga undan og eru ein góð fyrimynd fyri uppvaksandi ættarliðið og fyri okkum øll.

Hetta kann vera í øllum liðum í samfelagnum. Innan almenna tænastu, vinnulív, list, vísindi, heilsufremjan, fakfelagsarbeiði, tónleik, ítrótt, manngóðum og sjálvbodnum arbeiði og so frameftir. Heiðurin skal, umframt føroyingum, eisini kunna latast útlendingum, sum gera eitthvørt serstakt fyri Føroyar.

Við hesi samtykt er ynskið, at Løgmansskrivstovan setur eitt arbeiði í gongd um, hvussu ein slíkur heiður kann skipast, og hvørjar reglur eiga at vera galdandi fyri tilnevning og val av teimum, sum fáa heiðurin. Eisini eigur uppskot at verða gjørt um, hvussu heiðurin skal síggja út, um hesin skal vera í fleiri stigum o.s.fr.

Grannalond okkara hava skipanir við heiðurstekni, sum landið letur.

Sum dømi kann nevnast, at grønlendski heiðurin Nersornaat (Grønlands hjemmestyres fortjenstmedalje) er ein ísbjørn, og verður hendan latin í silvuri ella gulli.

Eitt annað dømi er íslendski Falkaheiðurin, ið verður latin í fimm ymiskum stigum, og sum íslendski forsetin letur 1. januar og 17. juni á hvørjum ári. Í flestu londum finnast hesi heiðurstekin í ymiskum útgávum og stigum. Í Føroyum kenna vit best danska riddarakrossin eins og líknandi heiðursskipanir eru at finna í Norra, Svøríki og Finlandi.

Uppskotssetararnir mæla til, at Løgmansskrivstovan setur í gongd arbeiðið at gera eina almenna heiðursskipan. Fyrsta stigið eigur at vera at seta nøkur fólk, ið hava røttu førleikarnar, til at gera eitt uppskot um, hvussu hesin heiður kann skipast, og at løgmaður so leggur lógaruppskot fyri Løgtingið.

Tað er umráðandi, at bæði tilnevning og latan av heiðrinum gongur fyri seg á skipaðan og politiskt óheftan hátt.

Talan er um at lata eina viðurkenning fyri merkisvert arbeiði, ið er fyrimyndarligt og sum gagnar landi og fólki. Tað eru kvinnur og menn, sum gjøgnum starv, eldhuga og gerningar sínar vinna Føroyum og føroyingum vitan, framburð, mentan, heilsu, trivnað ella annað og sum hava uppiborið at fáa eina almenna viðurkenning fyri hetta.

**Á Løgtingi, 7. mars 2022**

Bjørt Samuelsen    Ruth Vang    Kristin Michelsen

Helgi Abrahamsen    Christian Andreasen    Bill Justinussen

**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 120/2021: Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin**

Bjørt Samuelsen, Ruth Vang, Kristin Michelsen, Helgi Abrahamsen, Christian Andreasen og Bill Justinussen, tingmenn, hava lagt málið fram 7. mars 2022, og eftir 1. viðgerð 23. mars 2022 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. apríl 2022.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann, Bárð á Steig Nielsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Beinta Løwe Jacobsen, Beinir Johannesen, Annika Olsen, Edva Jacobsen og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:

Flestu grannalond okkara hava eitt ella fleiri heiðurstekin, ið verða latin. Í Føroyum hava heiðurstekin áður verið latin. Undir hoyringini er komið fram, at hesi vórðu latin millum 1957 og 1975. Føroysku heiðurstekinini vórðu latin fyri bjarging, at hava ført stóra veiðu til hús, fyri hús og heim osfr.

Í Dimmalætting 19. september 1959 sæst í grein á forsíðuni, at *"Landsstýrið handar monnum prógv og tekini "Fyri hús og heim" og "Bundin er bátleysur maður""*.

Dagblaðið 31. oktober 1970 vísir í grein á somu heiðurstekin, ið eru handað henda dagin. Í greinini kemur fram, at í dómsnevndini sita yvirvrakarin, vrakieftirlitsmenninir og virðismetingarmenn landsstýrissins. Heiðurstekinini vórðu latin triðja hvørt ár.

Heiðurslønin *Bundin er bátleysur maður* varð latin fyri framúrskarandi røkiskap. Heiðurslønin *Hús og heim* varð latin fyri stóra og væl hagreidda veiðu.

Tíðin er sjálvandi nógv broytt síðani hesar heiðurslønir vórðu latnar, men stundin er komin til at fara undir at fyrireika eitt nýtt føroyskt heiðurstekin, so Føroyar kunnu lata ein almennan heiður til kvinnur og menn, sum á serstakan, dyggan hátt hava tænt landi ella fólki.

Umráðandi er, at slíkt heiðurstekin er politiskt óheft, og tí er styrkin við hesum uppskotinum, at seks av sjey politiskum flokkum í tinginum hava lagt tað fram.

At fyrireika leiðreglur fyri eitt alment heiðurstekin tekur tíð, og tí eigur at verða farið undir arbeiðið beinavegin, so Føroyar í komandi framtíð kunnu heiðra fólki við einum føroyskum heiðurstekni.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Djóni Nolsøe Joensen og Jóhannis Joensen) hevur hesar viðmerkingar:

Vit sum javnaðarflokkur taka ikki undir við eliterum heiðursteknum. Tó stuðla vit átøkum og heiðran av vanliga fólkinum. Fyriliggjandi uppskot vísir ikki greitt, hvussu hetta heiðurstekin skal skiljast, og hvør málbólkurin er.

Undir nevndarviðgerðini er eisini komið fram, at summir hoyringarpartar skilja eitt slíkt heiðurstekin sum elitert. Tað er við støði í hesum iva, at umboð javnaðarfloksins í nevndini ikki taka undir við uppskotinum.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Mentanarnevndin, 26. apríl 2022**

| | | |
|---|---|---|
| Beinta Løwe Jacobsen<br>formaður | Beinir Johannesen<br>næstformaður | Jóhannis Joensen |
| Djóni Nolsøe Joensen | Bjarni Kárason Petersen | Annika Olsen |
| | Edva Jacobsen | |

# Fylgiskjal 2:

# Uppskot til Løgtingslóg um Tignarmerki Føroya

**Uppskot til**

# Løgtingslóg
# um
# Tignarmerki Føroya

*Endamál*

**§ 1.** Tignarmerki Føroya verður handað persónum fyri fyrimyndarligt, merkisvert og serstakt avrik, ið gagnar landi og fólki, og sum tænir Føroyum ella umheiminum.
*Stk. 2.* Tignarmerki kann í serligum føri handast umboðum fyri útlendsk ríki, lond og millumtjóða felagsskapir.

**§ 2.** Løgmaður ræður yvir tignarmerkjaskipanini og er verji hjá henni.
*Stk. 2.* Løgmaður tilnevnir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerkið.
*Stk. 3.* Tignarmerkið er ogn landsins og skal latast landinum aftur, tá ið tignarberin doyr.

*Heitini*

**§ 3.** Heitini í tignarmerkjaskipanini eru hesi:
1) Heitið á tignarmerkinum er "Tignarmerki Føroya".
2) Skipanin við einum tignarmerki fær heitið: "Tignarmerkjaskipan".
3) Nevndin við fyrisitingarligu ábyrgdini av tignarmerkinum fær heitið: "Tignarmerkjanevnd".
4) Ritarin í tignarmerkjanevndini fær heitið: "Tignarritari".
5) Tann, sum fær handað tignarmerkið, fær heitið: "Tignarberi".

*Tignarmerkjanevndin*

**§ 4.** Løgmaður setur eina tignarmerkjanevnd við fýra limum, sum fær til uppgávu at taka ímóti øllum uppskotum um persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerkið.

**§ 5.** Formansskapur Løgtingsins leggur fram tilmæli til løgmann við lista yvir persónar, sum mettir verða skikkaðir at sita í fyrstu tignarmerkjanevndini.

**§ 6.** Løgtingsfólk, landsstýrisfólk ella kommunustýrislimir kunnu ikki vera limir í tignarmerkjanevndini.

**§ 7.** Nevndarlimir verða valdir fyri eitt fýra ára skeið við møguleika fyri afturvali eina ferð í eitt tvey ára skeið.
*Stk. 2.* Í fyrstu nevndini sita allir nevndarlimirnir í fýra ár. Síðan verða tveir av limunum skiftir út. Hetta verður gjørt við lutakasti, ella við at nevndin sjálv skipar seg hesum viðvíkjandi.
*Stk. 3.* Tá ið nevndarlimir leggja frá sær ella verða skiftir út, leggur tignarmerkjanevndin tilmæli við lista yvir møguligar nýggjar nevndarlimir til løgmann at taka støðu til.
*Stk. 4.* Limir verða sitandi í nevndini, til løgmaður hevur tilnevnt nýggjar limir.

**§ 8.** Nevndin skipar seg sjálv við forfólki og varaforfólki og ásetur sína egnu fundarskipan. Løgmansstjórin virkar sum tignarritari nevndarinnar.

**§ 9.** Arbeiðið í nevndini er ólønt heiðursstarv.

**§ 10.** Tignarmerkjanevndin metir um innkomin uppskot og ger eitt samt tilmæli til løgmann, sum tekur endaliga støðu til tilmæli nevndarinnar.

*Innsignir*

**§ 11.** Løgmaður ásetir í kunngerð reglur um tey innsignir, ið Tignarmerki Føroya skal hava.

*Handan*

**§ 12.** Løgmaður handar Tignarmerki Føroya.
*Stk. 2.*Tignarmerkið verður vanliga handað á hvørjum ári tann 1. januar. Í serligum førum kann frávik gerast frá hesum degi.
*Stk. 3.* Handanin fer fram í Tinganesi. Tala umstøður og atlit fyri tí, kann tignarmerkið handast aðrastaðni í Føroyum ella uttanlands.
*Stk. 4.* Berst løgmanni frá at handa tignarmerkini, handar varaløgmaður tey.
*Stk 5.* Berst løgmanni frá at handa tignarmerkini uttanlands, handar landsstýrisfólkið í uttanríkismálum ella viðkomandi føroyskt sendifólk á staðnum.

*Heiðursbræv*

**§ 13.** Saman við tignarmerkinum fær móttakarin heiðursbræv, undirritað av løgmanni, við stuttari grundgeving fyri tillutanini.

*Nýtsla*

**§ 14.** Tignarmerkið er eitt bringuprýði, sum verður borið á klædnabúna vinstrumegin á bringuni. Tað kann berast einsamalt ella saman við donskum og útlendskum ordanum og medaljum.
*Stk. 2.* Tignarmerkið kann berast á tjóðbúna ella veitslubúna til almennar ella serstakar hátíðarligar løtur.

*Afturtøka*

**§ 15.** Løgmaður kann, eftir at hava hoyrt tignarmerkjanevndina, taka tignarmerki aftur frá persóni, sum verður dømdur fyri álvarsamt lógarbrot ella á annan hátt fremur virksemi, ið gongur ímóti teimum virðum, ið heiðurin umboðar.

*Fyrisiting*

**§ 16.** Løgmansskrivstovan umsitur tignarmerkjaskipanina og er fyrisitingarligur karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini.
*Stk. 2.* Løgmansskrivstovan ber kostnaðin av at hava eina tignarmerkjaskipan og tignarmerkjanevnd.

*Gildiskoma*

**§ 17.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Tann 7. mars í 2022 løgdu løgtingsfólkini Bjørt Samuelsen, Ruth Vang, Kristin Michelsen, Helgi Abrahamsen, Christian Andreasen og Bill Justinussen fram løgtingslógaruppskot við heitinum "Uppskot til samtyktar um føroyskt heiðurstekin". Í álitinum frá Mentanarnevndini tann 26. apríl í 2022 tók meirilutin undir við uppskotinum. Løgtingið samtykti uppskotið tann 28. apríl í 2022, og løgtingssamtyktin, hereftir nevnd løgtingssamtyktin, var soljóðandi:

"Løgtingið heitir á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um føroyskt heiðurstekin at lata persónum fyri merkisvert arbeiði ella gerning, ið gagnar landi og fólki og tænir Føroyum".

Í viðmerkingunum varð heitt á Løgmansskrivstovuna um at seta arbeiðið í gongd at kanna, hvussu ein føroyskur heiður kundi skipast, við reglum um, hvussu persónar verða tilnevndir og valdir til slíkan heiður. Harumframt skuldi arbeiðið fevna um útsjóndina á føroyska tignarmerkinum, og hvussu nógv stig tað skuldi hava.

Í november í 2023 setti Aksel V. Johannesen løgmaður eina nevnd, hereftir nevnd nevndin, við fýra fólkum, hvørs uppgáva var at gera fullfíggjað uppskot um eina skipan við føroyskum heiðurstekni. Tann 25. februar í 2026 útskrivaði løgmaður løgtingsval at vera tann 26. mars í 2026. Á flaggdegnum hin 25. apríl í 2026 handaði nevndin Beini Johannesen løgmanni sítt álit við heitinum "Álit um føroyskt heiðurstekin". Nevndin mælir til:

- At ein føroysk tignarmerkjaskipan byggir á tann fólkaræðisliga virðis- og siðaarv, sum Føroyar sum land, samfelag og tjóð eru sprotnar úr, byggja á og framhaldandi vilja byggja á.
- At skipanin ikki er ein ordanarskipan, men byggir á íblástur frá skipanarligu meginreglunum hjá bæði ordanum og medaljum.
- At skipanin verður tillagað til nútíðarsamfelagið, og at bygnaðurin verður kjølfestur í galdandi samfelagsskipanum uttan at sleppa tí grundvølli, sum tignarmerkir byggja á.
- At Føroyar gera eitt tignarmerki, sum formliga hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum, og sum á klædnabúna kann berast saman við donskum og útlendskum tignarmerkjum.
- At ein føroysk tignarmerkjaskipan ikki er automatisk, har persónar uttan at hava avrikað nakað merkisvert fáa tignarmerki, men er grundað á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum lýst út frá einum víðum sjónarhorni.
- At løgmaður ræður yvir føroysku tignarmerkjaskipanini, er verji hjá henni og tilnevnir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið Tignarmerki Føroya.
- At ein sjálvstøðug og politiskt óheft tignarmerkjanevnd verður sett, sum fær til uppgávu at taka ímóti øllum uppskotum um persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerkið. Nevndin metir ítøkiliga um uppskotini og ger samt tilmæli til løgmann at taka endaliga støðu til.
- At føroyska Uttanríkistænastan kemur við tilmæli til tignarmerkjanevndina, tá ið talan er um protokollerar og diplomatiskar handanir. Tá ið talan er um handanir til aðrar útlendingar, eigur tignarmerkjanevndin at ráðføra seg við Uttanríkistænastuna, áðrenn tilmæli verður givið løgmanni.

- At skipanin tryggjar, at uppskot kunnu verða viðgjørd óheft og í trúnaði, og at bæði uppskotssetarar og fólk, sum verða skotin upp, tilmæld og tilnevnd, eru vard.
- At ein føroysk tignarmerkjaskipan hevur eitt stig.
- At tignarmerkini eru ogn landsins.
- At løgmaður ásetir í kunngerð reglur um tey innsignir (tey sjónligu sereyðkenni, ið saman mynda útsjóndina), ið Tignarmerki Føroya skal hava.
- At Tignarmerki Føroya hevur tey innsignir, sum eru lýst í teksti og upprunaligu tekningum eftir listamannin Edward Fuglø í álitinum um eitt føroyskt heiðurstekin, við teimum tillagingum, ið kunnu vera neyðugar í sambandi við framleiðsluna.
- At tá ið tignarmerkið er gjørt, skulu øll innsignir vera í samsvari við tær nágreinaðu tekningar og lýsingar, sum eru góðkendar av løgmanni.
- At Løgmansskrivstovan verður karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini og ber kostnaðin av teimum útreiðslum, sum ein tignarmerkjaskipan og tignarmerkjanevnd hava við sær.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Hóast evropisku tignarmerkjaskipanirnar stava frá gamlari tíð, hava flestu lond hildið fast um eina skipan við ordanum og medaljum. Ein grund er, at staturin á henda hátt kann vísa persónum takksemi og viðurkenning fyri fyrimyndarlig avrik, sum gagna samfelagnum og menniskjanum sum heild. Í viðmerkingunum til løgtingssamtyktina stendur, at "Føroyar eiga at hava eitt føroyskt heiðurstekin, eina ærumedalju - almennan heiður - ið kann latast kvinnum og monnum, sum á serstakan, dyggan og rósuppibornan hátt tæna landi og fólki. Persónar, sum uttan mun til starvsøki ella samfelagsstætt gera nakað serstakt og merkisvert í virkni og verki sínum í samfelagnum. Persónar, sum ganga undan og eru ein góð fyrimynd fyri uppvaksandi ættarliðið og fyri okkum øll.

Hetta kann vera í øllum liðum í samfelagnum. Innan almenna tænastu, vinnulív, list, vísindi, heilsufremjan, fakfelagsarbeiði, tónleik, ítrótt, manngóðum og sjálvbodnum arbeiði og so frameftir. Heiðurin skal, umframt føroyingum, eisini kunna latast útlendingum, sum gera eitthvørt serstakt fyri Føroyar".

Støðan í dag er tann, at Føroyar hava ikki eitt tignarmerki, sum er landsins hægsti heiður, ið fevnir um alt samfelagið at lata persónum fyri fyrimyndarligt merkisvert avrik. Føroyskur heiður av hesum slag verður latin í ávísum geirum í samfelagnum. Á mentanarøkinum letur landið Mentanarvirðisløn landsins og heiðursgávu. Viðvíkjandi tilbúgving letur landið heiðurstekin fyri 25 og 40 ára tænastu og fyri serlig avrik í tilbúgvingini. Kommunurnar heiðra somuleiðis borgarar á ymsan hátt. Sambært skjølum hjá Løgmansskrivstovuni hava ávís heiðurstekin verið latin í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1957 til 1975. Tey vóru lík eini medalju og avmarkað til valaavrik í fiskiskapi, bóndaskapi og bjarging. Statsligu tignarmerkini letur danska kongshúsið føroyingum eftir teimum ásetingum, sum danska skipanin setur. Av tí at Føroyar, sum land, ikki hava møguleikan at vísa egnum borgarum og útlendingum súmbolska viðurkenning á hægsta stigi, kann sigast, at tørvur er á hesum.

Nevndin metir, at løgtingssamtyktin og viðmerkingarnar siga greitt, hvat endamálið skal vera við eini føroyskari tignarmerkjaskipan. Út frá hesum verður mælt til, at hetta løgtingslógaruppskot verður grundarlagið undir einari føroyskari tignarmerkjaskipan, sum skal gera tað møguligt hjá landinum at heiðra egnar borgarar og útlendingar fyri fyrimyndarligt, merkisvert og serstakt avrik, ið gagnar landi og fólki, og sum tænir Føroyum ella umheiminum.

**Heitini í eini føroyskari tignarmerkjaskipan**

Heitini í tignarmerkjaskipanini eru gjørd í samráð við Málráðið. Nevndin metir, at tørvur er á føroyskum orði, sum breitt fevnir um orðini -heiðursmerki, -heiðurstekin og danska orðið -dekorationer, men sum samstundis ítøkiliga vísir til eitt serstakt føroyskt heiðurstekin, sum landið letur. Orðið tignarmerki er valt sum felagsheiti, har seinni orðliðurin eisini sipar til heitið á føroyska flagginum Merkið. Ítøkiliga føroyska tignarmerkinum verður mælt til at fáa heitið Tignarmerki Føroya. Nevndin hevur síðan tikið fyrra orðliðin tign og sett hann saman við øðrum orðum, sum síðan verða nýtt um ymsu heitini í eini føroyskari tignarmerkjaskipan soleiðis, at skipanin fær ein málfrøðiligan samanhang.

Tá í talan er um at lýsa útsjóndina á tignarmerkinum, heldur nevndin, at orðið -útsjónd ikki verður mett at hava nøktandi innihaldsligan týdning. Ymsu norðurlendsku ordanarskipanirnar nýta latínska orðið -insigne (-insignia fleirtal), sum merkir tekin ella súmbol. Insignia fevnir um eina nágreiniliga lýsing av øllum teimum sjónligu sereyðkennum (snið, litir, súmbol og tilfar), sum saman mynda útsjóndina á eini ordan ella medalju. Insignia kunnu sporast aftur til fornøldina, har fysiskir súmbolskir prýðislutir vórðu nýttir av herdeildum og aðalinum fyri at vísa tilknýti og tignarstig. Nevndin heldur, at føroyska skipanin á sama hátt eigur at hava eitt orð, ið lýsir samlaðu serstøku útsjóndina á føroyska tignarmerkinum, og hevur gjørt av at gera latínska orðið -insigne um til eitt føroyskt hvørkikynsorð, -innsigni, ið verður bent eftir sama mynstri sum -kvæði. Dømi um hvørfalsbending eru hesi: -innsigni (óbundið eintal), -innsigni ella innsignir (óbundið fleirtal) og -innsignini (bundið fleirtal).

**Ein nútíðar føroysk tignarmerkjaskipan**

Nevndin heldur tað vera skynsamt at gera eina føroyska tignarmerkjaskipan, sum ikki er ein ordanarskipan, men sum byggir á íblástur frá skipanarligu meginreglunum hjá bæði ordanum og medaljum. Tí tað er ríkisovastin, sum ræður yvir eini ordan, og henda gamla skipan myndar eina tíð, tá ið tað var natúrligt at gera mun á fólki. Tað liggur í løgtingssamtyktini, at føroyskir myndugleikar skulu ráða yvir føroysku tignarmerkjaskipanini, og at hon sum útgangstøði ikki skal gera mun á fólki. Ein nýggj skipan eigur at byggja á tann fólkaræðisliga virðis- og siðaarv, sum Føroyar sum land, samfelag og tjóð eru sprotnar úr, byggja á og framhaldandi vilja byggja á. Hon eigur at verða tillagað til nútíðar samfelagið, har allir borgarar sum útgangsstøði høvdu kunnað fingið handað føroyska tignarmerkið, um viðkomandi atlit og meting talaðu fyri tí. Bygnaðurin eigur at kjølfestast í galdandi samfelagsskipanir uttan at sleppa tí grundvølli, sum tignarmerkir byggja á. Í hesum sambandi er tað skynsamt at gera eitt tignarmerki, sum formliga hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum, og sum á klædnabúna kann berast saman við donskum og útlendskum tignarmerkjum. Grønland gjørdi í 1989 sína egnu tignarmerkjaskipan, tá ið heimastýrið fylti 10 ár. Grønlendska tignarmerkið er ein medalja, og formansskapurin í grønlendska tinginum ræður yvir skipanini. Tignarmerkið hóskar inn í statsligu skipanirnar við tignarmerkjum og verður borið saman við øðrum tignarmerkjum.

Álitið á føroysku skipanini verður tongt at, hvussu skipanin verður sett saman og handfarin. Skipanin má vera politiskt óheft og álítandi í sínum virksemi og umdømi og eigur ikki at vera automatisk, skilt á tann hátt, at persónar í ávísum størvum, lønarflokki ella samfelagsbólkum fáa tignarmerkið uttan at hava avrikað nakað fyrimyndarliga merkisvert og serstakt fyri føroysku tjóðina ella umheimin. Tað er ávísur hierarkiskur automatikkur í gomlu norðurlendsku skipanunum, og hetta var ein av grundunum til, at

Svøríki frá 2018 til 2023 arbeiddi við at dagføra sína tignarmerkjaskipan. Framvegis er ávísur automatikkur í svensku skipanini, men skipanin hevur samstundis eitt sjálvstøðugt ordanarráð, sum ítøkiliga metir um avrik í sambandi við tilmæli til fleiri av svensku tignarmerkjunum. Tá ið Ísland í 1944 gjørdist lýðveldi og harvið fekk ræði á skipanini við Falkaordanini, varð sett ein ordanarnevnd at meta um, hvør skuldi fáa ordanina. Í fyrstuni endurspeglaði skipanin Dannebrogsordanina, men við tíðini gjørdist Falkaordanin minni automatisk og byggir í dag fyri tað mesta á ítøkiligar metingar av avrikum hjá persónum.

Tað er grundleggjandi fyri føroysku skipanina, at landsins hægsti heiður verður ein viðurkennandi tignarmerkjaskipan, hvørs trúvirði og legitimitetur byggja á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum, sum verður eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni. Til hetta endamál eigur ein sjálvstøðug og óheft tignarmerkjanevnd at verða sett, sum fær til uppgávu at taka ímóti øllum uppskotum um persónar, sum høvdu kunnað fingið føroyska tignarmerkið, og skal ítøkiliga viðgera tey.

Vanligt er í mongum evropiskum skipanum, at tignarmerkini hava fleiri stig. Tað er tó ein grundleggjandi fortreyt sambært viðmerkingunum til løgtingssamtyktina, at føroyska skipanin ikki skal byggja á automatikk, men á ítøkiliga og sjálvstøðuga meting av hvørjum einstøkum avriki. Ein skipan við fleiri stigum hongur saman við siðvenjuni um hierarkiskan automatikk, har persónar í ávísum embætum ella tignarstigum í samfelagnum fáa handað ávíst stig av tignarmerkinum, sum síðan kann uppstigast. Tískil metir nevndin, at ein skipan við einum stigi heldur seg til meginreglurnar við føroysku skipanini og tryggjar, at munur ikki verður gjørdur millum tey, sum fáa tignarmerkið. Løgmaður skal tó hava møguleikan at taka spurningin um eina stigaskipan upp aftur, um umstøður og atlit tala fyri tí.

**Ræðið á tignarmerkjaskipanini**

Føroyska tignarmerkið verður hægsta og tignarligasta viðurkenning, ið fevnir um alt samfelagið, og tað verður mett rímiligt og neyðugt, at landið stýrir síni egnu skipan. Løgmaður eigur at ráða yvir føroysku tignarmerkjaskipanini og at vera verji hennara. Løgmaður er stjórnarleiðari og umboðar Føroyar og føroyska fólkið heima og úti. Harumframt verður diplomati stýrt frá útinnandi valdinum, og tað er løgmaður, sum tekur ímóti ríkisovastum og stjórnarleiðarum, tá ið teir koma til Føroya. Hetta hevur týdning, tá ið talan er um at geva útlendingum føroyska tignarmerkið. Løgmaður eigur at virka fyri at verja trúvirðið í skipanini og álitið á hana. Tá ið løgmaður ræður yvir skipanini, tilnevnir hann teir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerki. Løgmaður tekur endaliga støðu til, hvør skal fáa tignarmerki, og ger hetta við støði í tilmæli, sum hann fær frá tignarmerkjanevndini.

Tignarmerkini eiga at vera ogn landsins og eiga ikki at verða latin persónum til ognar. Harumframt verða tignarmerkini latin einstøkum persónum fyri ítøkilig avrik og eiga ikki at kunna arvast. Tað merkir, at tignarmerkið skal latast landinum aftur, tá ið tignarberi er deyður.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Løgtingslógaruppskotið hevur ikki verið til ummælis, men verður tað, um fyrireikingar verða gjørdar at bera uppskotið í Løgtingið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Ein føroysk tignarmerkjaskipan hevur fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið. Kostnaðarmetingin er gjørd við støði í tilmæli nevndarinnar um at framleiða tignarmerkið úr dygdartilfari við stórum listarligum, mentanarligum og søguligum virði. Størsti framleiðslukostnaðurin verður í fyrstuni, serliga í sambandi við at sniðgeva tignarmerkið klárt til framleiðslu, gera serligan stoypiform og gera eina heimasíðu, sum ger ta møguligt hjá fólki talgilt at lata inn uppskot um persónar.

Framleiðslan fevnir í fyrstuni um útreiðslur til at:

- sniðgeva og menna tignarmerkið listarliga.
- stoypa tignarmerkini við tilfari úr silvuri og gulli og at glasa tey við ymsum litum.
- framleiða og sniðgeva eskjur og heiðursbræv.
- gera heimasíðu.

Tað verður mett ráðiligt at framleiða avmarkaða nøgd av tignarmerkjum í fyrstu atløgu, tí at tað kunnu hugsast tillagingar í framleiðsluni. Eftir fyrsta framleiðsluárið minka útreiðslurnar væntandi, tí tignarmerkini eru gjørd klár til framleiðslu, nøkur eru framleidd, verða latin aftur við tíðini og síðan latin nýggjum móttakarum, og ein heimasíða er komin at virka. Tá ið skipanin er komin í gongd, verður talan um munandi minni útreiðslur, ið fevna um framleiðslu av einstøkum tignarmerkjum, viðlíkahaldi og tilhoyrandi fyrisiting.

Tilsamans verður mett, at framleiðslukostnaðurin fyrsta árið kann liggja millum 300.000 og 500.000 kr., alt eftir, hvussu langa tíð tað tekur at koma til endaliga produktið við tignarmerkinum íroknað eskju og heiðursbræv, og hvussu nógv tignarmerkir verða framleidd. Eftir hetta kann væntast, at kostnaðurin verður á leið 50.000–70.000 kr. árliga fyrstu árini, um fleiri tignarmerkir skulu framleiðast, og síðan ein minni kostnaður, 50.000 kr. árliga, fyri viðlíkahald og einstakar framleiðslur eftir tørvi. Tað er torført at gera nágreinaða meting av samlaðu útreiðslunum. Talan er um eina nýggja tilgongd og framleiðslu, har fleiri lið í arbeiðinum, eitt nú sniðgeving, framleiðsla og tilfarsval, ikki verða endaliga fastløgd, fyrr enn lógaruppskotið um Tignarmerki Føroya er samtykt. Tað er tí neyðugt at rokna við ávísari óvissu í kostnaðarmetingunum í fyrstuni.

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Løgmansskrivstovan verður karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini og situr fyri øllum arbeiðinum viðvíkjandi tí. Somuleiðis verður tað Løgmansskrivstovan, sum ber kostnaðin fyri útreiðslurnar, sum ein tignarmerkjaskipan og tignarmerkjanevnd hava við sær. Arbeiðsorkan hjá Løgmansskrivstovuni kann væntast at vera størst í fyrstuni, tá ið skipanin verður bygd upp, serliga í sambandi við fyrstu handanirnar. Mett verður, at arbeiðsorka svarandi til umleið eitt fjórðings fulltíðarstarv kann verða neyðug tað fyrsta árið, og at tørvurin síðani fer at minka, tá ið skipanin er farin at virka.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Umsitingin av tignarmerkinum fer fram í tignarmerkjanevndini og á Løgmansskrivstovuni. Lógaruppskotið hevur ongar aðrar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur av týdningi.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum, hvørki Hoyvíkssáttmálan, Evropiska mannarættindasáttmálan EMRS ella Sáttmála Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar og flytføri
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri markaforðingar og flytføri.

### 2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Heitið "Tignarmerki Føroya" er valt í samráð við Málráðið.

Sambært viðmerkingum til løgtingssamtyktina frá 28. apríl 2022 skal tignarmerkið latast persónum, sum ganga undan og eru góð fyrimynd fyri uppvaksandi ættarliðið og okkum øll. Hetta kann vera í almennari tænastu, vinnulívi, mentan, list, vísindum, heilsufremjan, fakfelagsarbeiði, ítrótti, manngóðum og sjálvbodnum arbeiði og so framvegis. Heiðurin skal eisini kunna latast útlendingum, sum gera eitthvørt serstakt fyri Føroyar.

Føroyska tignarmerkið verður hægsta og tignarligasta viðurkenning, ið fevnir um alt samfelagið, og kann handast persónum búsitandi í Føroyum og uttanlands. Tignarmerkjanevndin eigur ítøkiliga at meta um, hvat eitt fyrimyndarligt merkisvert og serstakt avrik er, og skal ikki tilmæla, at persónur fær tignarmerki, uttan at viðkomandi hevur avrikað fyrimyndarligt heiðursvert avrik fyri føroysku tjóðina ella umheimin.

Ásetingarnar í § 1, stk. 2 snúgva seg um politiska samband Føroya við umheimin. Ætlanin við ásetingini er, at skipanin í serligum føri skal gera tað møguligt hjá løgmanni at handa útlendskum umboðum fyri ríki, lond ella millumtjóða felagsskapir tignarmerki, tá ið tað kann gagna og verja national áhugamál Føroya og styrkja diplomatiska sambandið við umheimin. Orðingin í stk. 2 fevnir um útlendskar ríkisovastar, limir í kongshúsum, stjórnarleiðarar, uttanríkisráðharrar, sendifólk, onnur viðkomandi umboð fyri ríki og lond og høgtstandandi umboð í ES, NATO, ST, norðurlendska samstarvinum og øðrum viðkomandi millumtjóða felagsskapum, sum Føroyar samstarva við ella eru partur av. Í øðrum londum verða tignarmerkir vanliga givin í sambandi við almennar vitjanir hjá ríkisovastum, og sendifólk kunnu fáa handað tignarmerki eins og umboð fyri millumtjóða felagsskapir. Hetta eru sokallaðar protokollerar ella diplomatiskar handanir. Hesar handanir byggja ikki á ítøkiliga meting av persónligum avrikum hjá útlendingum, men eru knýttar at umboðandi embætinum hjá viðkomandi og snúgva seg um sínámillum viðurkennandi diplomatisk viðurskifti millum lond. Tá ið talan er um slíkar handanir, heldur nevndin, at føroyska skipanin somuleiðis eigur at halda seg til galdandi diplomatiskar siðvenjur um protokollerar handanir av tignarmerkjum. Á hesum øki leggur skipanin upp til partvísan automatikk, eins og galdandi er í norðurlendsku ordanarskipanunum. Norðurlendsku skipanirnar hava tó fleiri møguleikar, av tí at tær eru samansettar av ymsum stigvísum ordanum og medaljum til ymisk endamál, har ávísar ordanir ella stig í ordanini eru ætlað ríkisovastum, statsligum umboðum og útlendingum annars. Vanligt er í hesum skipanum, at kongur ella forsetin kann taka avgerð um handanir til limir í kongshúsinum og ríkisovastar. Sum heild eru tað uttanríkisráðini í londunum, sum á ymsan hátt eru knýtt at protokollerum handanum og handanum til útlendingar.

Nevndin heldur, at eitt partvíst protokollert sjálvvirkni ikki skal virka óheft av tignarmerkjanevndini. Øll uppskot um bæði føroyskar borgarar og útlendingar skulu viðgerast av tignarmerkjanevndini, men tignarmerkjanevndin eigur ikki at taka stig til sjálv at koma við tilmælum til løgmann um protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar. Slík stig eiga at verða tikin av fyrisitingini hjá landsstýrinum, av tí at slíkar handanir eru beinleiðis knýttar at politiska sambandi Føroya við umheimin og áhugamálum Føroya í hesum sambandi. Tískil er tað føroyska Uttanríkistænastan, sum

eigur at koma við tilmæli til tignarmerkjanevndina, tá ið talan er um allar protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar. Tá ið talan er um handanir til útlendingar, sum ikki formliga umboða eitt ríki, land ella millumtjóða felagsskap, eigur tignarmerkjanevndin at ráðføra seg við Uttanríkistænastuna, áðrenn tilmæli verður givið løgmanni, av tí at tað ikki kann útilokast, at slíkar handanir eisini hava uttanríkispolitiskan týdning.

**Til § 2**
Løgmaður ræður yvir skipanini og tilnevnir tískil teir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið tignarmerki. Løgmaður tekur endaliga støðu til, hvør skal fáa tignarmerki, og ger tað við støði í tilmæli, sum hann fær frá tignarmerkjanevndini. Løgmaður er verji hjá tignarmerkjaskipanini og eigur at virka fyri at verja trúvirðið í skipanini og álitið á hana, so at skipanin virkar sum ætlað. Tignarmerkini eru ogn landsins og verða latin einstøkum persónum fyri ítøkilig avrik og kunnu ikki arvast. Tískil skulu avvarðandi lata landinum tignarmerkið aftur, tá ið tignarberi er deyður.

**Til § 3**
Heitini í tignarmerkjaskipanini eru gjørd í samráð við Málráðið.

**Til § 4**
Valið av nevndarlimum eigur ikki at verða býtt út til ávísar geirar og áhugapartar í samfelagnum at taka støðu til, av tí at tey í sínum virki natúrliga røkja tey áhugamál, sum teimum er álagt at umboða. Harumframt verður tað trupult at velja út ávísar partar fram um aðrar, av tí at tignarmerkjaskipanin er grundað á ítøkiliga innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni. Løgmaður góðkennir og tekur endaliga støðu til tilmælini um nevndarlimir, men hesi tilmæli skulu ikki koma frá honum sjálvum.

Føroyska samfelagið er lítið, og tað skulu ikki sita ov nógv fólk í nevndini. Tað verður mett hóskandi fyri føroysku tignarmerkjanevndina at hava fýra nevndarlimir umframt ein tignarritara, sum er løgmansstjórin.

**Til § 5**
Tá ið fyrsta tignarmerkjanevndin skal tilnevnast, verður tað mett hóskandi, at formansskapur Løgtingsins kemur við samdum tilmæli um fólk í fyrstu tignarmerkjanevndini at leggja fyri løgmann til endaliga støðutakan. Løgtingið umboðar alt Føroya fólk, og formansskapurin er sambært Tingskipanini hitt hægra fyriskipaða stýrið í Løgtinginum og umboðar tingið úteftir. Tilmælið skal innihalda ein óraðfestan lista við fleiri fólkum, sum mett verða skikkað til starvið, soleiðis at talan er um fleiri valmøguleikar. Á listanum eiga at standa minst tvífalt so nógv fólk, sum løgmaður skal tilnevna. Nevndin eigur at verða sett saman av kvinnum og monnum, sum tilsamans umboða alt føroyska samfelagið, sum eru politiskt óheft, saklig og umboða ongan annan enn seg sjálv. Nevndarlimir eiga ikki at sita í Løgtingi, Landsstýri ella kommunustýri. Tey tilmældu eiga at hava hollar lívsroyndir, stórt trúvirði, vera alment vird og hava innlit í, hvat rørist ymsastaðni í føroyska samfelagnum og millum fólk.

**Til § 6**
Skal nevndin virka politiskt óheft, kunnu virkandi løgtingsfólk, landsstýrisfólk og kommunustýrislimir ikki sita í nevndini.

**Til § 7**
Limirnir í tignarmerkjanevndini sita í fýra ár við møguleika fyri at verða afturvaldir í tvey ár afturat. Eitt fýra ára skeið er valt fyri at hava vitanarframhald og støðugar arbeiðsumstøður í nevndini. Av somu grund eigur øll nevndin ikki at verða skift út samstundis, men í mesta lagi tveir limir í senn. Í fyrstu tignarmerkjanevndini kann hetta gerast soleiðis, at allir nevndarlimirnir sita í fýra ár, og at síðan verða ein ella tveir av limunum skiftir út. Tað kann verða gjørt við lutakasti, ella at tignarmerkjanevndin sjálv skipar seg hesum viðvíkjandi.

Eftir at løgmaður hevur sett fyrstu tignarmerkjanevndina við støði í tilmæli frá formansskapi Løgtingsins, kemur hon síðan sjálv við einum samdum tilmæli til løgmann um nýggjar nevndarlimir. Tilmælið skal somuleiðis innihalda ein óraðfestan lista við fleiri fólkum, sum mett verða skikkað og halda seg til somu meginreglur sum formansskapur Løgtingsins. Grundin til, at tignarmerkjanevndin sjálv skal tilmæla nýggjar limir, er, at tað gevur rúm fyri, at tilmæli eru politiskt óheft, so at tey hvørki koma frá Løgtingi, Landsstýri ella útvaldum geirum og áhugapørtum í samfelagnum. Harumframt veit nevndin, hvat krevst av arbeiðinum, og uppbyggir sær vitan um føroyska samfelagið og fólk, sum hóska seg og eru skikkað til hetta starv.

Tá ið skipanin hevur virkað í nøkur ár, eigur tað at tala fyri at koma í nevndina, at persónur hevur fingið handað tignarmerkið. Eru fólkini í nevndini tignarberar, er tað ein álitisváttan og viðurkenning frá landinum. Hesi fólk verða sostatt mett at vera skikkað til at sita í tignarmerkjanevndini. Í fyrstuni verður tað avmarkað, hvussu nógvir nevndarlimir eru tignarberar, men við tíðini veksur skarin.

Limir í nevndini skulu verða sitandi, til løgmaður hevur tilnevnt nýggjar nevndarlimir, og skipanin leggur ikki upp fyri varalimum. Væntað verður, at tignarmerkjanevndin fær persónliga og viðkvæma vitan um nógv fólk í samfelagnum, og tí skulu ikki fleiri fólk enn neyðugt fáa atgongd til nevndina.

**Til § 8**
Nevndin hevur fund nakrar ferðir um árið. Fyri at nevndin fær virkað væl og so óheft sum møguligt, eigur arbeiðið ikki at verða skipað ov stirvið frá byrjan. Nevndin fer sjálv at gera sær sínar royndir um skynsaman og hóskandi arbeiðshátt og eigur at kunna tillaga tær. Tískil verður lagt upp til, at nevndin sjálv skipar seg við forfólki og varaforfólki og ásetur sína egnu fundarskipan. Í fundarskipanini eigur at verða lagt upp fyri, at nevndin skal kunna virka skjótt, um neyðugt er við skjótum tilmæli til løgmann.

Nevndin telur fýra limir. Løgmansstjórin er tignarritari nevndarinnar, men telur ikki sum fimti limurin. Tá ið løgmaður hevur ræði á tignarmerkjaskipanini, eigur løgmansstjórin at virka sum tignarritari. Ritarastarvið í nevndini kann ikki metast við vanligt fyrisitingarligt fulltrúastarv í einum aðalráði. Nevndin fer at arbeiða í tí stilla við trúnaðarupplýsingum og persónum. Tað hevur týdning, at so fá sum møguligt hava atgongd til arbeiðið hjá nevndini. Hetta hevur við sær, at tignarritarin má hava heimildir, so at viðkomandi ikki verður noyddur at fara ígjøgnum fleiri leiðsluløg fyri at kunna fremja sítt arbeiði. Ritarin skal samskifta beinleiðis við løgmann í øllum málum, sum viðvíkja tignarmerkjanevndini. Til samanberingar kann nevnast, at í Íslandi er tað stjórin á forsetaskrivstovuni, sum er ritari í ordanarnevndini.

Uppgávurnar hjá tignarritaranum eru at kalla til fundar, samskipa alt samskifti við løgmann, tignarmerkjanevndina og tilmældar persónar, hava um hendi øll tilmæli og øll formlig skjøl í sambandi við tilmæli og handanir, hava tignarmerkini í varðveitslu og syrgja fyri hátíðarhaldi í sambandi við handanir av tignarmerkjum.

**Til § 9**
Nevndararbeiðið er ólønt heiðursstarv, sum ikki er motiverað av peningaligum áhugamálum. Limirnir í tignarmerkjanevndini fáa tó endurrindaðar útreiðslur, sum standast av fundum og øðrum virksemi í sambandi við arbeiðið í nevndini. Endurgjald fer fram sambært galdandi almennum reglum um útreiðsluendurgjald.

**Til § 10**
Í sínum virksemi eigur tignarmerkjanevndin at stuðla løgmanni í at verja trúvirðið í skipanini og álitið á hana. Tignarmerkjanevndin tekur ímóti øllum uppskotum um møguligar persónar, sum kunnu fáa tignarmerki. Nevndin metir ítøkiliga um innkomin uppskot og kann sjálv koma við uppskotum. Nevndarlimir skulu ikki skjóta seg sjálvan upp at fáa tignarmerki ella aðrar sitandi nevndarlimir. Nevndin ger eitt samt tilmæli til løgmann um, hvørji fólk verða mett at hava uppiborið eitt tignarmerki. Semja hevur týdning fyri ikki at sáa iva um metingarevnini hjá tignarmerkjanevndini, og um teir persónar, sum fáa handað tignarmerkið. Tignarmerkjanevndin skal leggja seg eftir at tilmæla persónar, sum fólk flest kunnu taka undir við.

Mett verður um, hvat eitt fyrimyndarligt, merkisvert og serstakt avrik er. Slík heiðursverd avrik fara út um tað, sum vanliga kann væntast av einum persóni í ávísum leikluti ella ávísum samanhangi í samfelagnum, sama hvør viðkomandi persónur er. Tað kunnu vera einstøk avrik ella lívsverk gjøgnum longri tíð. Harumframt verða heiðursverd avrik framd í øllum pørtum av samfelagnum. Eftir hesi avrik liggur munagott og varandi gagn fyri samfelagið og menniskjað, sum hevur uppiborið ein serligan tjóðarheiður. Sambært viðmerkingunum til løgtingssamtyktina frá 28. apríl 2022 um eitt føroyskt heiðurstekin er talan um avrik hjá kvinnum og monnum, "sum gjøgnum starv, eldhuga og gerningar sínar vinna Føroyum og føroyingum vitan, framburð, mentan, heilsu, trivnað ella annað og sum hava uppiborið at fáa eina almenna viðurkenning fyri hetta".

Uppskot til reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar er viðlagt sum fylgiskjal 3 í álitinum um føroyskt heiðurstekin.

**Til § 11**
Ásetingin gevur løgmanni heimild til við kunngerð at staðfesta endaligu innsignini á Tignarmerki Føroya. Innsignir eru øll tey sjónligu súmbolsku sereyðkenni (snið, skap, litir og tilfar) á tignarmerkinum, sum saman mynda útsjóndina. Orsøkin er, at tað upprunaliga sniðuppskot, ið er gjørt, er sniðgivið sum eitt liðugt listarligt konsept, sum tó, har tørvur er, verður tillagað í framleiðslutilgongdini. Um innsignini vórðu fastløgd beinleiðis í hesi lóg, áðrenn tignarmerkið var gjørt klárt til framleiðslu, hevði lógin bundið útsjóndina til eitt fyribils snið. Tað hevði kunnað forðað neyðugum broytingum, sum mugu hava fyrilit fyri tilfarsvali, tekniskum krøvum, framleiðsluviðurskiftum og handaligum arbeiði. Ásetingin er tískil ætlað at tryggja smidleika, har tað er neyðugt fyri endaligu sniðgevingina og framleiðsluna, samstundis sum hildið verður fast um grundleggjandi innsignir og listarliga konseptið við Tignarmerki Føroya, tá ið ræður um hugskot, útsjónd, litir, sereyðkenni og súmbolskan týdning. Nevndin mælir til, at Tignarmerkið Føroya skal hava tey innsignir, sum eru lýst í teksti og upprunaligu tekningum eftir listamannin Edward Fuglø í viðlagda

áliti til hetta løgtingslógaruppskot. Álitið hevur heitið “Álit um føroyskt heiðurstekin” og sæst í fylgiskjali 1. Fyrivarni skal tó takast fyri teimum tillagingum, ið kunnu vera neyðugar í sambandi við framleiðsluna. Tá ið tignarmerkið er gjørt, eiga øll innsignir at vera í samsvari við tær nágreinaðu tekningar og lýsingar, sum eru góðkendar av løgmanni.

Gjørt verður vart við, at sniðuppskotið hevur Edward Fuglø sjálvur gjørt, og tað er eitt upprunaligt verk. Nevndin hevur, eftir avtalu við listamannin, fingið loyvi til at vísa og nýta hansara upprunaliga sniðuppskot í álitinum. Semja er um, at nýtslan er avmarkað til tað arbeiðið, sum hevur verið neyðugt hjá nevndini fyri at skriva álitið, tað arbeiðið, sum er neyðugt hjá Løgmansskrivstovuni fyri at fyrireika hetta løgtingslógaruppskot, og tað arbeiðið, sum er neyðugt hjá Løgtinginum fyri at kunna viðgera hetta løgtingslógaruppskot. Almannakunngerð í hesum sambandi merkir ikki, at sniðuppskotið frítt kann gerast tøkt fyri almenninginum, nýtast, avritast ella á annan hátt gagnnýtast av triðjaparti til onnur endamál enn tey, sum eru nevnd í hesum løgtingslógaruppskoti og viðlagda áliti. Sniðuppskotið er vart sambært galdandi upphavsrættarligum reglum umframt møguligum viðkomandi reglum um sniðgevingarrætt. Upphavsrætturin til sniðuppskotið er hjá Edward Fuglø. Nýtsla ella gagnnýtsla av sniðuppskotinum krevur frammanundan samtykki frá upphavsrættarhavaranum, uttan so, at annað er avtalað við upphavsrættarfólkið. Um løgtingslógaruppskotið um Tignarmerki Føroya verður samtykt, eigur avtala um upphavsrætt millum listamannin og landið at fáa gildi.

**Til § 12**

Løgmaður handar sum útgangsstøði tignarmerkini í Føroyum. Skipanin leggur upp fyri, at til ber at handa tignarmerki uttanlands. Fyri at varðveita skipanina sum serliga viðurkennandi hevur tað týdning, at ikki ov nógv tignarmerkir verða handað. Tað eiga ikki at handast fleiri enn trý tignarmerkir árliga, tó við tí fyrivarni, at talið kann verða størri ella minni, alt eftir um grundarlag er fyri at heiðra fleiri ella færri.

Handanin eigur at fara fram ein fastan hátíðardag, samstundis sum møguleiki skal vera fyri at handa aðrar dagsetingar. Ólavsøka ella flaggdagurin kundu verið fastir handanardagar. Teir dagarnar hendir kortini nógv, sum leggur hald á løgmann og almenningin. Tí er 1. januar ein hóskandi dagur. Dagurin er súmbolskur við at vera fyrsti dagurin í nýggja árinum. Dagurin er vanliga sera friðarligur bæði hjá løgmanni og almenninginum.

Tað er hóskandi, at handanin sum útgangsstøði fer fram í søguligu bygningunum í Tinganesi, sum løgmaður ræður yvir. Skipanin eigur samstundis at leggja upp fyri, at tignarmerkir kunnu handast á øðrum hóskandi staði í Føroyum ella uttanlands, um umstøður og atlit tala fyri tí. Tey, sum fáa handað tignarmerkið, eiga at kunna taka næstringar við, løgtingsforfólkið eigur at fáa høvi at vera við, tignarmerkjanevndin eigur at vera til staðar, og miðlarnir eiga at fáa høvi at vera við til part av tiltakinum. Tað eigur at almannakunngerast við stuttari grundgeving, tá ið tignarmerkir eru latin.

Ber ikki til hjá løgmanni at handa tignarmerki, kann hann útveita handanina til varaløgmann ella tað landsstýrisfólk, sum er næst í røðini. Ber ikki til hjá løgmanni at handa uttanlands, kann hann útveita handanina til landsstýrisfólkið í uttanríkismálum ella viðkomandi føroyskt sendifólk á staðnum.

**Til § 13**
Saman við tignarmerkinum fær móttakarin eitt heiðursbræv, sum er undirritað av løgmanni. Heiðursbrævið hevur til endamáls at staðfesta tann serliga týdning, sum liggur í heiðrinum, og at lýsa í stuttum, hví viðkomandi hevur uppiborið at fáa Tignarmerki Føroya. Soleiðis verður tryggjað, at hvør handan er væl grundað, lýst fyri bæði móttakaranum og almenninginum, og at sjálvur heiðurin verður knýttur beinleiðis at avrikum móttakarans. Brævið er eisini ætlað sum varandi prógv um heiðurin.

**Til § 14**
Tignarmerkið er eitt bringuprýði, sum verður borið á klædnabúna vinstrumegin á bringuni. Tað kann berast einsamalt ella saman við donskum og útlendskum ordanum og medaljum. Tignarmerkið kann berast á tjóðbúna ella øðrum veitslubúna til almennar ella serstakar hátíðarligar løtur.

**Til § 15**
Løgmaður kann eftir at hava hoyrt tignarmerkjanevndina taka tignarmerki aftur frá persóni, sum verður dømdur fyri álvarsom lógarbrot ella á annan hátt fremur virksemi, ið gongur ímóti teimum virðum, ið heiðurin umboðar.

Tá ið talan er um at heiðra persónar við landsins hægsta tignarmerki fyri fyrimyndarliga merkisvert og serstakt avrik, eigur tað at vera ein treyt, at viðkomandi ikki skal hava framt ella vera dømdur fyri nakað álvarsamt lógarbrot. Verður fyrilit ikki havt fyri lógarbroti, er skjótt, at almenningurin missir álitið á skipanini og metingarevnunum hjá tignarmerkjanevndini og løgmanni.

Í Danmark verða tilmældir persónar bidnir um loyvi til at eftirkanna teir í brotsverksskrásetingini hjá løgregluni. Í Íslandi og Grønlandi er ikki ynskiligt at spyrja persónar, um til ber at kanna teir hjá løgregluni. Persónur verður tó ikki tilmældur, um viðkomandi er dømdur fyri lógarbrot, ella illgruni er um óreiðiligan atburð. Skipanirnar leggja eisini upp fyri, at tignarmerkið verður kravt aftur frá tignarbera, um viðkomandi seinni verður dømdur fyri lógarbrot. Í sambandi við at verja persónsupplýsingar hevur kravið um at skula biðja um loyvi til at leita fram upplýsingar um møgulig lógarbrot við sær, at óneyðug viðkvom og privat vitan fæst um viðkomandi. Vísir tað seg aftaná, at tignarberi verður dømdur fyri álvarsamt lógarbrot ella ber seg at á ein hátt, ið gongur ímóti teimum virðum, sum heiðurin umboðar, skal skipanin gera tað møguligt, at løgmaður kann taka tignarmerkið aftur frá tignarbera. Hetta eigur at verða gjørt eftir at hava hoyrt tignarmerkjanevndina.

**Til § 16**
Løgmansskrivstovan skal umsita tignarmerkjaskipanina og vera karmur um virksemið hjá tignarmerkjanevndini og allari fyrisiting hesum viðvíkjandi. Løgmansskrivstovan veitir skrivstovutænastu til tignarmerkjanevndina, røkir dagligu umsitingina og ber kostnaðin av útreiðslunum, sum ein tignarmerkjaskipan hevur við sær.

Tignarmerkjaskipanin verður landsins hægsti almenni heiður og byggir á álitið um, at hon verður handfarin við varsemi og virðing. Tað er trupult at fáa eina álítandi tignarmerkjaskipan við ítøkiligum metingum av persónum at virka, um almenningurin samstundis skal kunna hava innlit í hesar metingar, áðrenn og eftir at persónar hava fingið handað tignarmerki. Væntað verður ávíst afturhaldni og virðing fyri arbeiðinum hjá tignarmerkjanevndini, so trúvirðið í skipanini og álitið á hana verða varðveitt. Arbeiðið og málsviðgerðin í tignarmerkjanevndini fara fram sambært teimum almennu

fyrisitingarligu meginreglunum. Tó er neyðugt, at skipanin so væl sum til ber tryggjar, at uppskot kunnu verða viðgjørd óheft og í trúnaði, og at nevndarviðgerðin verjir bæði uppskotssetarar og teir persónar, sum verða tilmæltir av nevndini til tignarmerki og innstillaðir av løgmanni. Viðgerðin av persónsupplýsingum og innlit í arbeiðið hjá nevndini eiga í praksis at verða tulkað avmarkandi til fyrimunar fyri uppskotssetarar og teir persónar, sum verða viðgjørdir, tilmæltir og tilnevndir at fáa tignarmerki.

**Til § 17**
Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, dagfesting

Beinir Johannesen
løgmaður

/ John Rajani
løgmansstjóri

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Álit um føroyskt heiðurstekin

# Fylgiskjal 3:

## Uppskot til reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar

# Uppskot til
# reglugerð fyri virksemi tignarmerkjanevndarinnar

## Uppskot

**§ 1.** Ein og hvør kann senda tignarmerkjanevndini uppskot um persónar, sum tey meta hava uppiborið eitt tignarmerki.
*Stk. 2.* Uppskotini skulu vera skrivlig og undirskrivað av einum ella fleiri uppskotssetarum.
*Stk. 3.* Uppskot frá nærmastu skyldfólkum verða ikki viðgjørd.
*Stk. 4.* Uppskotssetarin fær ikki svar um viðgerðina av uppskotinum.
*Stk. 5.* Øll innkomin uppskot verða viðgjørd í trúnaði.
*Stk. 6.* Nevndin hevur tagnarskyldu og kann eftir tørvi fáa sær fleiri upplýsingar til vegar.

## Viðgerð

**§ 2.** Nevndin viðger innkomin uppskot og ger samt tilmæli til løgmann, sum tekur endaliga støðu til, hvør skal fáa eitt tignarmerki.
*Stk. 2.* Nevndin skal í sínum virki umboða alt tað føroyska samfelagið og stuðla løgmanni í at verja trúvirðið í tignarmerkjaskipanini og álitið á hana.
*Stk. 3.* Nevndarlimir eru politiskt óheftir, sakligir og umboða ongan annan enn seg sjálvan.
*Stk. 4.* Nevndin kann sjálv koma við uppskotum. Limir í nevndini kunnu ikki skjóta upp seg sjálvan ella aðrar sitandi nevndarlimir at fáa tignarmerki.
*Stk. 5.* Viðgerðin av innkomnum uppskotum skal grundast á ítøkiliga óhefta innihaldsliga meting av avrikum hjá persónum eyðmerkt út frá einum víðum sjónarhorni.
*Stk. 6.* Nevndin metir um, hvat eitt fyrimyndarligt, merkisvert og serstakt avrik er. Slíkt avrik fer út um tað, sum vanliga kann væntast av einum persóni í ávísum leikluti ella ávísum samanhangi í samfelagnum, sama hvør viðkomandi er.
*Stk. 7.* Avrik kunnu vera einstøk avrik ella lívsverk í longri tíð. Eftir hesi avrik liggur jaligt og varandi gagn fyri samfelagið og menniskjað, sum hevur uppiborið serligan tjóðarheiður.
*Stk. 8.* Nevndin eigur at leggja dent á at tilmæla persónar, sum mett verður, at fólk flest høvdu tikið undir við.
*Stk. 9.* Nevndin eigur at leggja upp fyri, at tað ikki verða handað fleiri enn trý tignarmerkir árliga, við fyrivarni fyri, at fleiri ella færri kunnu handast, um serligar umstøður tala fyri tí.
*Stk 10.* Arbeiði nevndarinnar fylgir almennu fyrisitingarligu meginreglunum.
*Stk. 11.* Tá ið talan er um innlit í arbeiði nevndarinnar og viðgerð av persónsupplýsingum, skal virksemi nevndarinnar tryggja, at bæði uppskotssetarar og tey, sum verða skotin upp, tilmæld og tilnevnd at fáa tignarmerki, verða vard.

## Útlendingar

**§ 3.** Tignarmerkið kann handast útlendingum og í serligum føri umboðum fyri ríkir, lond ella millumtjóða felagsskapir.
*Stk. 2.* Tignarmerkjaskipanin heldur seg til galdandi siðvenjur, tá ið talan er um sínámillum viðurkenning millum lond og protokollerar handanir av tignarmerkjum.
*Stk. 3.* Nevndin tekur ikki stig til sjálv at koma við tilmæli til løgmann um protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar.
*Stk. 4.* Uttanríkistænastan kemur við tilmæli til nevndina í sambandi við allar protokollerar og diplomatiskar handanir til útlendingar.
*Stk. 5.* Nevndin ráðførir seg við Uttanríkistænastuna, áðrenn tilmæli verður givið løgmanni í sambandi við handanir til aðrar útlendingar, sum ikki umboða eitt ríki, land ella millumtjóða felagsskap.

## Tignarritarin

**§ 4.** Løgmansstjórin er tignarritari. Alt fyrisitingarligt arbeiði liggur hjá tignarritaranum.
*Stk. 2.* Ritarin kallar nevndina til fundar, samskipar arbeiðið í nevndini og samskiftir við nevndina, løgmann og tey, sum eru í uppskoti at fáa tignarmerki.
*Stk. 3.* Ritarin hevur um hendi øll uppskot um persónar og øll formlig skjøl í sambandi við tilnevningar og handanir og hevur í varðveitslu tignarmerkini.
*Stk. 4*. Ritarin kallar nevndina til fundar í seinasta lagi 1. oktobur.
*Stk. 5.* Ritarin skipar fyri hátíðarhaldi, tá ið tignarmerkir verða handað.

## Handan

**§ 5.** Tignarmerkið verður vanliga handað tann 1. januar. Frávik kunnu í serligum førum gerast frá hesum degi.
*Stk. 2.* Til handanina kunnu luttaka: Løgmaður, tey, sum fáa handað tignarmerkið, næstringar, løgtingsforfólkið, tignarmerkjanevndin og fjølmiðlar.

Løgmansskrivstovan, dagfesting

Beinir Johannesen
løgmaður

/ John Rajani
løgmansstjóri

# Uppskot til tignarmerkjanevndina

## 1. Upplýsingar um persón í uppskoti

Fulla navn: ______________________________

Føðingardagur og -staður: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Starv: ______________________________

Møgulig viðmerking: ______________________________

## 2. Grundgeving fyri persón í uppskoti

Lýsing av einstøkum avriki ella avrikum í longri tíð (í mesta lagi tvær A4 síður):

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

Greið frá, hví viðkomandi hevur uppiborið at fáa Tignarmerki Føroya (í mesta lagi ein A4 síða):

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

______________________________

## 3. Upplýsingar um uppskotssetara

Navn: ______________________________

Bústaður/felag: ______________________________

Telefon/teldupostur: ______________________________

Undirskrift: ______________________________

Dagfesting: ______________________________

Møgulig viðmerking: ______________________________

## Vegleiðing

Uppskot skulu vera skrivlig og undirritað.
Uppskot frá nærmastu skyldfólkum ella ósaklig uppskot verða ikki viðgjørd.
Øll uppskot verða viðgjørd í trúnaði.

## Uppskot skulu sendast til:

Tignarmerkjanevndina
Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postrúm 64
FO-110 Tórshavn

# Fylgiskjal 4:

## Bakstøði um norðurlendsku tignarmerkjaskipanirnar

# 1. Danska tignarmerkjaskipanin

Í Danmark er tignarmerkjaskipanin ein gomul skipan við uppruna í einaveldistíðini. Formliga grundarlagið stavar frá viðtøkum í 1693, kallaðar statuttir, við smávegis broytingum seinnu árini. Tignarmerkini fevna um tvær kongligar riddaraordanir, *Elefantordenen* og *Dannebrogsordenen,* og tvær kongligar medaljur, *Fortjenestemedaljen* og *Belønningsmedaljen*. Elefantordanin hevur røtur aftur til 15. øld og verður í høvuðsheitum handað limum í danska kongshúsinum, útlendskum kongshúsum, fúrstadømum og ríkisovastum. Kongshúsið varðar av skipanini. Tað er tann til eina og hvørja tíð sitandi monarkurin, sum ræður yvir donsku tignarmerkjunum. Kunning um skipanina finst á heimasíðuni hjá kongshúsinum á www.kongehuset.dk.

## Dannebrogsordanin

Dannebrogsordanin varð stovnað í 1671. Upprunaliga hevði hon eitt stig og varð bert handað fúrstum og aðalinum. Í 1808 fevndi ordanin eisini um borgarliga føddar persónar, harvið fekk hon fleiri stig við vaksandi tign. Endamálið var, at borgarar uttan mun til tignarstig og støðu í samfelagnum skuldu kunna heiðrast fyri sermerkt avrik. Í 1951 varð avgjørt, at kvinnur eisini skuldu kunna fáa hesa ordan. Formliga grundarlagið undir Dannebrogsordanini hvílir enn, við smærri broytingum, á statuttum frá 1693 og viðtøkunum frá 1808.

## Stigaskipan

Dannebrogsordanin hevur tríggjar flokkar býttar á seks stig. Lægsta stigið er riddari, síðan kemur kommandørur og stórkrossurin. Hægsta stigið er stórkommandørur, sum er ætlað limum í kongshúsinum. Meginreglan er, at byrjað verður við at handa persónum lægsta stig, sum er riddarakrossurin, tó kunnu frávik gerast frá hesum. Persónar, sum hava fingið lægsta stig, kunnu uppstigast, tá ið teir hava verið riddarar í nøkur ár. Ein uppstigan krevur ávísa innihaldsliga broyting, t.d. í almennari fyrisiting, at viðkomandi persónur hevur fingið hægri starv í hægri lønarflokki. Við uppstigan skulu persónar lata lægra tignarmerkið inn aftur.

1. flokkur:

- Stórkommandørur av Dannebrog
- Stórkrossurin við og uttan stjørnu

2. flokkur:

- Kommandørur av 1. stigi av Dannebrog
- Kommandørur av Dannebrog

3. flokkur:

- Riddari av 1. stigi av Dannebrog
- Riddari av Dannebrog

Dannebrogsordanin hevur eisini eitt heiðurstekin, sum hevur sjálvstøðuga tign.

Stórkommandørkrossurin og kommandørkrossurin verða av monnum bornir um hálsin. Stórkrossurin verður av monnum borin í bandi um høgru øksl ella í ketu. Riddarakrossurin av 1. stigi og heiðursteknini hjá Dannebrogsordanini verða borin í bandi við rosettu vinstrumegin á bringuni, og riddarakrossurin verður borin í bandi á vinstru síðu á bringuni við ongari rosettu. Undantikið stórkrossin bera kvinnur tignarmerkini í sloyfu vinstrumegin á bringuni. Hetta er tó um at broytast til eisini at verða eitt band. Tignarmerkini kunnu berast fastar hátíðardagar, eitt nú á føðingardegnum hjá sitandi monarkinum.

## Kongligu medaljurnar

Fortjenestemedaljan er frá 1792 og formliga stovnað í 1845. Medaljan hevur tvey stig, eitt úr silvuri og eitt úr gulli. Medaljan úr silvuri verður givin persóni, sum hevur starvast fyri sama almenna myndugleika í minst 40 samanhangandi ár. Medaljan er ætlað starvsfólkum, sum ikki hava leiðslustarv, og sum ikki koma undir treytirnar fyri at kunna fáa riddarakrossin. Medaljan úr gulli verður ikki givin ofta.

Belønningsmedaljan varð stovnað í 1865. Medaljan hevur fýra stig: Ein gullmedalja og ein silvurmedalja við og við ongari krúnu. Medaljan verður givin privatsettum fyri 50 ára starvsaldur í somu privatu fyritøku ella í sambandi við fráferð eftir minst 40 ára starvstíð.

## Fyrisiting

Ordanarkapitlið (Ordenskapitlet) varð stovnað í 1808 og situr fyri tignarmerkjaskipanini. Tá ið Danmark fór frá einaveldi til fólkaræði í 1848–1849, fekk kongur ábyrgdina av allari tignarmerkjaskipanini, og ordanarkapitlið gjørdist serstøk eind beinleiðis undir kongi, sum varð ordanarharri. Skipanin er sostatt skild frá statsligu politisku fyrisitingini.

Ordanarkapitlið tekur sær av at:

- fyrireika handanir av ordanum og medaljum og tey skjøl, sum fylgja við.
- krevja inn aftur eina ordan frá persónum við uppstigan til hægri stig, um viðkomandi persónar eru dømdir fyri nakað revsivert, og tá ið viðkomandi persónur er deyður.
- hava yvirlit yvir teir persónar, sum hava fingið eina ordan, og goyma lívsrensl teirra.

Tað er ávísur automatikkur í skipanini, har skipanin heiðrar fólk, sum eru knýtt at statinum, eitt nú politikarar, embætisfólk, diplomatar og fólk úr herinum. Fólk, ið hava rokkið ávísum hierarkiskum stigi í samfelagnum, kunnu fáa eina ordan, um tey verða tilmæld. Eitt nú fólk, sum hava verið politikarar í ávíst áramál ella hoyra til ávísan lønarflokk. Sendifólk í Danmark fáa eina ordan, um donsk sendifólk í viðkomandi landi fáa eina sambærliga ordan. Øll, sum fáa eina ordan, kunnu senda sítt lívsrensl til skjalasavnið hjá ordanarkapitlinum.

Vanliga eru tað ymsu donsku aðalráðini, sum umvegis aðalstjórarnar, ið tilmæla persónar á sínum málsøki og senda uppskotini til ordanarkapitlið í kongshúsinum. Tilmælini verða løgd fyri kong, sum er ordanarharri, til endaliga støðutakan. Ordanarharrin kann eisini sjálvur tilnevna fólk. Í Føroyum er tað Ríkisumboðið, sum fyrireikar mál um handanir og sendir uppskot til ordanarkapitlið ígjøgnum danska forsætismálaráðið. Borgarar kunnu koma við uppskotum til Ríkisumboðið. Tað verður ikki grundgivið alment fyri, hví viðkomandi fær eina ordan. Persónurin sjálvur fær skrivliga grundgeving. Tá ið talan er um medaljur, er tað vanliga arbeiðsplássið sjálvt, sum tilmælir síni starvsfólk at fáa medalju. Í Føroyum vendir viðkomandi starvspláss sær til Ríkisumboðið. Áðrenn endalig støða verður tikin um at handa persóni eina ordan ella medalju, verða tilmældir persónar bidnir um samtykki til, at løgreglan kann eftirkanna teir í brotsverksskrásetingini.

## Handan

Ordanir verða sum meginregla handaðar tvær ferð um árið, fyrst í januar og á føðingardegnum hjá sitandi monarkinum. Harumframt eru tað javnan handanir í sambandi við statsvitjanir, serlig høvi, og tá ið donsku aðalráðini tilmæla persónar, embætisfólk, heryvirmenn ella onnur, sum hava framt viðurkenningarverda tænastu. Riddarakrossurin verður oftast handaður av aðalstjórum ella stjórum á undirstovni hjá ráðunum. Hetta hendir allan vegin upp til stórkrossin, sum kongur handar. Tá ið danski monarkurin vitjar Føroyar, er siðvenja, at monarkurin handar borgarum ordanir og ávísar medaljur í Føroyum.

Tá ið medaljan verður handað í Føroyum, plagar tað at vera arbeiðsgevarin, sum handar. Medaljan verður av monnum borin í krossbandi vinstrumegin á bringuni. Kvinnur bera medaljuna í sloyfu ella í bandi vinstrumegin á bringuni.

Kongshúsið hevur vanliga almennar móttøkur (audiens), har tey, sum hava fingið ordan ella medalju, kunnu fáa høvi til at takka kongi fyri handanina.

## Afturtøka

Danskir myndugleikar ella kongshúsið fylgja ikki við persónum, sum hava fingið eina ordan, fyri at eftirkanna, um tey hava framt nakað lógarbrot. Vísir tað seg, at vitan kemur fram um, at persónur, sum hevur eina ordan, er dømdur fyri lógarbrot, verður heitt á viðkomandi um at lata ordanina inn aftur.

Ein ordan er ogn hjá kongshúsinum og skal handast aftur til kongshúsið, tá ið persónur doyr. Hetta er eisini galdandi fyri ordanir, sum eru handaðar útlendingum. Medaljurnar eru til ognar og skulu ikki latast aftur við deyða.

## 2. Grønlendska tignarmerkjaskipanin

Grønland stovnaði eina fortjenestemedalju í sambandi við 10 ára hátíðarhaldið hjá grønlendska heimastýrinum í 1989. Hon verður kallað *Nersornaat*, sum merkir heiðursmerki, og á henni er ein ísbjørn. Skipanin er regulerað í "Bestemmelser for Nersornaat". Sí heimasíðuna hjá grønlendska tinginum á www.ina.gl.

Medaljan er tignarligasta viðurkenningin frá grønlendskum myndugleikum til borgarar og útlendingar fyri heilt serligt uppiborið avrik gjøgnum langt áramál Grønlandi at gagni í samfelagstænastu, vinnu, list, vísindum o.ø. Formansskapurin í grønlendska tinginum ræður yvir og situr fyri skipanini og avger sjálvur í samráði við grønlendsku stjórnina, hvør skal fáa medaljuna. Uppskot um persónar skulu sendast formansskapinum.

Formansskapurin handar medaljuna og kann útveita handanina til ting- og stjórnarlimir. Persónur kann missa medaljuna, um tað vísir seg, at viðkomandi ger seg sekan í viðurskiftum, sum annars høvdu útihýst viðkomandi frá at fingið medalju. Grønlendska medaljan er úr gulli og silvuri. Gull verður givið eina ferð árliga og silvur í mesta lagi fimm ferðir árliga, tó við undantøkum. Medaljan úr gulli skal latast aftur við deyða, silvurmedaljan er ogn móttakarans.

Medaljan er viðurkend (approberet) av kongshúsinum og verður á klædnabúna borin eftir teimum ásetingum, ið eru galdandi fyri donsk tignarmerki. Hon kann berast einsamøll ella saman við donskum og útlendskum tignarmerkjum og verður borin vinstrumegin á bringuni í krossbandi.

# 3. Íslendska tignarmerkjaskipanin

Kristian kongur X stovnaði Falkaordanina undir vitjan síni í Íslandi í 1921. Ísland var tá sjálvstøðugt kongsríki undir donsku krúnuni. Undir seinna heimsbardaga, tá ið Danmark varð hertikið, fekk ríkisfyristøðumaðurin í Íslandi heimild til at handa Falkaordanina, og forsætisráðharrin útnevndi ein mann at sita í fyrstu ordanarnevndini í Íslandi. Fyrr hevði hesin fyrisitingarligi partur ligið hjá ordanarkapitlinum í Danmark. Kongur var ordanarharri, men avhendaði ein part av ábyrgdini og fyrisitingini til Íslands. Tá ið Ísland gjørdist lýðveldi í 1944, yvirtók landið Falkaordanina, og fyrsti íslendski forsetin gjørdist stórmeistari og ráddi yvir skipanini.

Falkaordanin verður givin íslendskum borgarum ella útlendingum fyri merkisvert avrik til frama fyri tjóðina, ávísar samfelagsbólkar ella øki, ella til frama fyri týdningarmikil mál fyri Ísland ella altjóða samfelagið.

Falkaordanin er formliga skipað við "Forsetabréf um hina íslensku fálkaorðu" og "Forsetabréf um starvsháttu orðunefndar" frá 6. januar 2006. Sí heimasíðuna hjá íslendsku forsetaskrivstovuni á www.forseti.is.

## Stigaskipan

Falkaordanin hevur fimm stig, har riddarakrossurin er lægsta stigið.

5. Stórkrossstjørnan
4. Stórkrossriddari
3. Stórriddari við stjørnu
2. Stórriddari
1. Riddari

Íslendski forsetin ber hægsta stig, tá ið hann tekur við embætinum, og maki hansara ber næsthægsta stig. Eins og við donsku skipanini verður byrjað við at geva borgarum riddarakrossin. Persónar kunnu uppstigast, eftir nøkur áramál, til næsta stig í skipanini, um hetta verður mett hóskandi av ordanarnevndini. Útgangstøðið er, at stig ikki verða lopin um, men at undantøk kunnu gerast frá tí. Verður uppstigað, skal lægra tignarmerkið latast inn aftur. Tá ið talan er um útlendskar ríkisovastar ella forsætisráðharrar, er vanligt at handa 4. stig (stórkrossin). Til ber eisini at handa hægsta stig. Verður Falkaordanin givin útlendingum, sum bera eina ordan úr heimlandi sínum, skulu teir helst fáa sama tignarstig í Falkaordanini.

Ásetingar eru eisini um, hvussu íslendska skipanin svarar til aðrar útlendskar skipanir, um tær hava fleiri stig.

Alt eftir tignarstigi verður ordanin borin á bringuni vinstrumegin, um hálsin ella í bandi. Ordanin kann berast til hátíðarhald, har forsetin er til staðar, og til aðrar serligar dagar, t.d. nýggjársdag, økisbundin hátíðarhald og persónligar hátíðardagar. Vanliga eru fólk í klædningi, veitsluklæðum ella tjóðbúna, tá ið tey bera ordanina. Tá ið rosetta fylgir við handanini, kann hon berast oftari uttan at bera sjálva ordanina.

## Fyrisiting

Íslendska forsetaskrivstovan situr fyri skipanini og hevur eina óhefta ordanarnevnd, ið viðger og metir um uppskot til Falkaordanina. Eftir uppskoti frá forsætisráðharranum velur forseti Íslands fimm persónar, sum skikkaðir eru til embætið, og sum hava fingið handað ordanina, at sita í nevndini. Ráðharrar kunnu ikki sita í nevndini. Limirnir sita í seks ár og kunnu endurveljast, tó í mesta lagi í trý ár afturat. Forsætisráðharrin velur nevndarforfólkið, og tann, sum hevur sitið longst í nevndini, verður varaforfólk. Allir limirnir verða ikki skiftir út í senn. Stjórin á forsetaskrivstovuni er ordanarritari og telur sum tann sætti nevndarlimurin. Nevndararbeiðið er ólønt heiðursstarv.

Nevndin viðger innkomin uppskot og tilmælir persónar til at fáa eina ordan. Tá ið Ísland tók yvir Falkaordanina frá Danmark, fingu nógv handað eina ordan automatiskt. Hetta var ein leivd frá skipanini við Dannebrogsordanini. Við tíðini er hetta broytt til, at persónar í dag skulu hava gjørt okkurt serligt fyri at fáa viðurkenning. Avrikini kunnu vera eitt ítøkiligt avrik ella avrik í eitt rættiliga langt tíðarskeið. Eitt týdningarmikið atlit er, at persónar skulu hava framt munandi íkast samfelagnum at gagni og gjarna til frama fyri nærsamfelagið.

Eftir samdum tilmæli frá nevndini avger forsetin, sum er stórmeistari, hvør skal fáa eina ordan. Stórmeistarin kann eisini sjálvur tilnevna persónar. Øll kunnu venda sær til nevndina við uppskotum um persónar. Nevndin tekur ikki ímóti talgildum uppskotum. Uppskot skulu sendast sum fysiskt bræv og verða undirritað av einum ella fleiri persónum. Mongdin av undirskriftum hevur ikki týdning fyri metingina hjá nevndini. Viðkomandi upplýsingar skulu vera um persónin, og grundgevast skal fyri, hví viðkomandi hevur uppiborið heiður. Nevndin góðtekur ikki uppskot frá nærstandandi familjulimum. Tá ið ordanarnevndin hevur góðkent at handa einum útlendingi eina ordan, skal íslendska uttanríkisráðið hoyrast. Tá ið talan er um diplomatiskar og protokollerar handanir, fer tað vanliga fram gjøgnum uttanríkisráðið, av tí at tað ikki eru handanir, ið byggja á eina ítøkiliga meting hjá ordanarnevndini.

Ordanarnevndin hittist á leið fimm ferðir árliga og heldur fund minst tveir mánaðir fyri ásettu handanardagseting. Nógv uppskot koma til nevndina, sum eru arbeiðskrevjandi hjá

nevndini at meta um. Fundirnir hava gildi, um fýra nevndarlimir eru møttir. Fundirnir skulu fráboðast í minsta lagi fimm dagar frammanundan, so nevndarlimir hava møguleikan at møta. Nevndarforfólkið stýrir fundinum og annars varaforfólkið. Ordanarritarin kallar til fundar eftir áheitan frá nevndarforfólkinum og innheintar neyðugar upplýsingar til nevndina. Álagt er ordanarritaranum at leggja fram ársroknskap og yvirlit yvir tignarmerkjagoymsluna. Ritarin tekur ímóti øllum uppskotum og syrgir fyri, at tey verða løgd fyri nevndina. Ritarin hevur í varðveitslu tignarmerkini, skjøl, ritbúnað og annað, sum fylgir við tignarmerkjaskipanini. Harumframt hevur hann ábyrgd av kunningartilfari um ordanina eftir leiðbeining frá ordanarnevndini. Í roynd og veru merkir tað, at tað er Forsetaskrivstovan, sum tekur sær av øllum fyrisitingarligum viðurskiftum hjá ordanarnevndini, og tað er statskassin, sum ber kostnaðin av skipanini.

## Handan

Forseti Íslands handar tignarmerki til íslendskar ríkisborgarar og útlendingar á Bessastøðum tann 1. januar og tann 17. juni á tjóðardegi Íslands. Undantøk kunnu gerast frá hesum. Forsetin kann útveita handanina í Íslandi til forfólkið í nevndini, og um tað ikki ber til, so til ordanarritaran. Undir serligum umstøðum kann stórmeistarin útveita uppgávuna at handa útlendingum eina ordan uttanlands til hesar persónar:

- Tær skipanir, sum handhevja forsetavaldið: Forsætisráðharrin, altingsforsetin og hægstarættarforsetin
- Uttanríkisráðharrin
- Nevndarforfólkið í ordanarnevndini
- Íslendskt sendifólk búsitandi uttanlands

Tað skal almannakunngerast, tá ið íslendskur ríkisborgari fær eina ordan, og hvat viðkomandi hevur gjørt fyri at hava uppiborið heiðurin.

## Afturtøka

Stórmeistarin kann eftir ráðgeving frá ordanarnevndini taka aftur ordan frá persóni, um viðkomandi verður funnin sekur í óhóskandi atferð. Nevndin spyr ikki tilmældar persónar, um løgreglan kann leita eftir teimum í síni brotsverksskráseting. Verða persónar dømdir fyri brotsverk, kann nevndin taka stig til at krevja ordanina aftur. Við deyða skal ordanin latast aftur.

# 4. Norska tignarmerkjaskipanin

Í Noregi er tignarmerkjaskipanin miðsavnað um *Den Kongelige Norske St. Olavs Orden* (St. Olavs Orden) og *Den Kongelige Norske Fortjenstordenen* (Fortjenstordenen). Ráðandi monarkurin í Noregi er stórmeistari, og galdandi statuttir eru seinast dagførdar í 2015. Sí heimasíðuna hjá norska kongshúsinum á www.kongehuset.no.

Tað er galdandi fyri bæði ordanir og medaljur, at øll kunnu senda inn uppskot um persónar, sum verða mettir at hava uppiborið eina ordan ella medalju. Fyristøðufólkið í viðkomandi sýslu í Noregi fer ígjøgnum innkomin uppskot um persónar í sýsluni og sendir síni tilmæli til kongshúsið.

## St. Olavsordanin

Oskar kongur I stovnaði St. Olavsordanina í 1847 til heiðurs fyri Ólav kong II, verndarhalgimenni Noregs. Ordanin verður latin fyri framúrskarandi tænastur til frama fyri Noreg og mannaættina. Konglig og ríkisovastar undantikin verður ordanin í dag fyri tað mesta givin norskum borgarum, sum virka í Noregi. Útlendingar fáa kongligu fortjenstordanina. Fyrr fingu í høvuðsheitum embætisfólk St. Olavsordanina, men við tíðini eru fleiri og fleiri úr vinnu- og mentanarlívinum vorðin heiðrað.

Ordanin verður býtt í trý stig:

3. Stórkrossurin
2. Kommandørur (tveir flokkar: Við stjørnu og við ongari stjørnu)
1. Riddari (tveir flokkar: riddari av 1 flokki og riddari)

Vanliga verður byrjað við lægri stigum, og ein uppstigan kann fara fram, um sami persónur fremur fleiri framúrskarandi avrik.

## Fyrisiting, handan og útilokan

Eftir innstilling frá hovstjóranum útnevnir stórmeistarin eitt ordanarráð, sum hevur uppgávuna at leggja tilmæli fyri stórmeistaran um persónar, sum hava gjørt seg serliga verdan til at fáa ein heiður. Í ráðnum sita ein kanslari, sum er formaður, varakanslari, sum er næstformaður, og tríggir aðrir limir. Limirnir sita í seks ár við møguleika fyri afturvali í fýra ár og møguliga

longur, um atlit tala fyri tí. Hovstjórin er fastur limur í ráðnum og virkar sum skattmeistari. Stjórnarlimir kunnu ikki sita í ráðnum. Kongshúsið stendur fyri fíggjarligu viðurskiftunum. Stórmeistarin tekur avgerð, tá ið hægsta stig í ordanini skal gevast, tá ið útlendingar skulu fáa eina ordan, ella tá ið onnur serlig høvi gera seg galdandi. Í serligum førum, tá ið talan er um skjóta avgerð, kann kanslarin sjálvur koma við tilmæli. Kansellistjórin fyrireikar mál til ordanarráðið, leiðir ordanarkanselliið og syrgir fyri vegna stórmeistaran, at ordanir verða handaðar. Harumframt eru knýtt at ordanarráðnum ein ordanarritari og ordanarkansellistur. Ráðið hittist vanliga tvær ferðir um árið.

Tað er stórmeistarin (kongur) ella ordanarkanselliið, sum handa ordanir vegna stórmeistaran. Uppgávan kann útveitast til fylkisfyristøðufólk og stjórar á sendistovunum í norsku uttanríkistænastuni.

Ein ordan kann verða tikin frá persóni, um viðkomandi vísir óreiðiliga framferð. Stórmeistarin tekur hesa avgerð eftir at hava spurt seg fyri hjá ordanarráðnum. Tá ið persónur doyr, skal ordanin latast aftur til ordanarkanselliið, og fær persónur handað hægri stig í somu ordan, skal lægra stigið latast inn aftur.

## Fortjenstordanin

Olav kongur V stovnaði Fortjenstordanina í 1985. Hon verður givin fyri framúrskarandi tænastu fyri Noreg og mannaættina og var í høvuðsheitum ætlað norskum borgarum fyri teirra virksemi í útlondum og útlendingum fyri teirra virksemi uttanlands ella í Noregi. Ordanin er býtt í trý stig á sama hátt sum St. Olavsordanin.

## Fyrisiting

Í hesum ordanarráði sita hovstjórin, sum virkar sum kanslari, protokollstjórin í uttanríkisráðnum (varakanslari) og kansellistjórin fyri St. Olavsordanina. Ráðið kemur við tilmælum til stórmeistaran. Stórmeistarin avger handanir til aðalin og aðrar serligar handanir. Kanslarin kann sjálvur koma við tilmælum, um atlit skulu takast til skjóta avgerð. Norska uttanríkisráðið stendur fyri skrivstovutænastuni og fíggjarliga partinum.

## Medaljur Noregs

Noreg hevur fleiri medaljur, eitt nú kunnu nevnast *Kongens fortjenstmedalje* frá 1908 og *St. Olavsmedaljen* frá 1939. Medaljurnar eru til ognar.

St. Olavsmedaljan verður givin fyri at heiðra virksemi, sum hevur breitt út vitan um Noreg og stimbrað sambandið millum tað útflytandi Noreg og heimlandið. Bæði norskir borgarar og útlendingar kunnu fáa medaljuna.

Kongsins fortjenstmedalja verður givin sum viðurkenning fyri:

- Pionervirki ella annað serligt virki, sum er serliga samfelagsgagnligt á økjunum list, mentan, vísindi, vinnulív, sosialt og manngott arbeiði.
- Serliga uppiborið ólønt virksemi í longri tíðarskeið í samfelagnum, í almennari ella privatari tænastu, í hjálparfelagsskapum ella í øðrum virksemi, sum hevur samfelagsligan týdning.
- Serliga uppiborið arbeiði í langt tíðarskeið í privatari ella almennari tænastu, har virksemið hevur verið væl út yvir tað vanliga, og har viðkomandi eisini hevur víst aktivt samfelagsíkast umframt sítt arbeiðsverk.
- Eitt lívsverk, sum kann standa sum fyridømi fyri onnur.

Í serligum førum kann medaljan handast í gulli.

## Fyrisiting

Eitt medaljuráð, sum kongur setur, ráðgevur kongi um, hvør kann fáa medalju. Í ráðnum sita hovstjórin, sum er formaður, leiðarin á kongligu skrivstovuni, sum er næstformaður, kanselli-stjórin, ordanarritarin og seniorritarin í ordanarkansellinum. Kongur kann eftir at hava hoyrt medaljuráðið gera av, hvussu síðani skal farast fram, um støður koma í, har óreiðilig viður-skifti verða knýtt at persóni, sum hevur fingið medalju.

# 5. Svenska tignarmerkjaskipanin

Svenska kongliga ordanarskipanin fevnir í høvuðsheitum um *Serafimerordenen*, *Nordstjerne-ordenen* og *Sværdordenen*, sum Fríðrikur kongur I stovnaði í 1748, og *Vasaordenen*, sum Gustav kongur III stovnaði í 1772. Harumframt hoyra til fleiri kongligar medaljur, og svenska stjórnin hevur eisini síni egnu tignarmerki. Kongligu ordanirnar og medaljurnar kunnu handast persónum, sum hava framt persónlig avrik fyri Svøríki ella svensk áhugamál, og almenninginum stendur frítt at senda ordanarkapitlinum uppskot um persónar, sum mettir verða at hava uppiborið eitt av svensku tignarmerkjunum. Skipanin er regulerað í "Förordning (2022:1800) om Sveriges främsta utmärkelser" og í "Stadgar för de kungl. svenska riddarordnarna. Fastställda i extraordinarie ordenskapitel den 15 februari 2023". Sí heimasíðuna hjá svenska kongshúsinum á www.kungahuset.se.

## Broytingin í 1975 og nýskipanin

Tignarmerkini hava søguliga verið nýtt til at heiðra framúr borgarligt og hernaðarligt íkast, men skipanin er broytt munandi við tíðini. Í 1975 avgjørdi svenski ríkisdagurin, at ordanir bert skuldu handast svenska kongshúsinum og útlendingum, serliga diplomatiskum umboðum, fyri at styrkja sambandið við Svøríki. Sum liður í at nútíðargera skipanina varð í 2018 avgjørt at fara undir eina tilgongd at broyta skipanina, so tað frameftir eisini bar til at heiðra svenskar ríkisborgarar. Í nýskipanararbeiðinum varð dentur lagdur á at tryggja gjøgnumskygda og førleikagrundaða mannagongd, har uppskot vórðu viðgjørd við støði í sakligum krøvum og fakligum avrikum. Meginreglurnar fyri handan skuldu broytast soleiðis, at undantikið beinleiðis protokollerum handanum gjøgnum svenska uttanríkisráðið skuldi frameftir takast støði í framúrskarandi avrikum hjá einstøkum persónum Svøríki ella svenskum áhugamálum at gagni. Handanir skuldu ikki vera automatiskar út frá samfelagsstøðu, tilknýti ella yrki. Tann 1. januar 2023 fekk nýggja svenska skipanin virknað, og til bar aftur at handa statslig tignarmerki til svenskar borgarar.

## Ordanir og medaljur

*Serafimerordenen*: Er fyrst og fremst ætlað svenska kongshúsinum, men kann eftir innstilling frá svensku stjórnini ella *Regeringskansliet* handast útlendskum ríkisovastum ella javnsettum persónum.

*Svärdsordenen*: Er ætlað persónum í hernaðarligari tænastu, sum gjøgnum sítt hernaðarliga virki hava framt persónligt avrik fyri Svøríki ella svensk áhugamál.

*Nordstjärneordenen*: Er ætlað persónum, sum hava framt persónligt avrik fyri Svøríki ella svensk áhugamál, serliga í almennum virksemi, umframt væl avrikað almenn størv og uppgávur.

*Vasaordenen*: Er ætlað persónum, sum hava framt persónligt avrik fyri Svøríki ella svensk áhugamál, serliga í ikki almennum virksemi, umframt væl avrikað almenn størv og uppgávur.

Serafimeordanin hevur eitt stig, og hinar ordanirnar hava fimm stig:

5. Kommandørur við stórkrossi
4. Kommandørur av 1. flokki
3. Kommandørur
2. Riddari av 1. flokki
1. Riddari

Svensku kongligu medaljurnar fevna m.a. um:

*Serafimermedaljen:* Ógviliga fáar verða latnar persónum, sum í sínum menniskjaliga ella alment samfelagsgagnliga virksemi sjónliga hava gjørt seg verd til heiðurin.

*H. M. Konunguns Medalj*: Latin svenskum borgarum fyri serliga tænastu og starvsfólkum í hovinum fyri drúgva og trúgva tænastu fyri kongshúsið.

*Litteris et Artibus*: Latin fyri framúr listarlig avrik í tónleiki, palllist og bókmentum.

*Prins Eugen-medaljen:* Latin fyri serliga týðandi listarlig avrik.

*Prins Carl-medaljen:* Latin fyri innanlands ella altjóða menniskjaligt virksemi.

## Fyrisiting

Ordanarkapitlið er hægsta fyristingarliga eindin og varðar av ordanarskipanini. Í ordanarkapitlinum eru stórmeistarin (kongur), ordanarkanslarin, varaordanarkanslarin umframt fýra limir, sum stórmeistarin hevur valt. Varaordanarkanslarin er ordanarritari hjá stórmeistaranum.

Kongur, sum er stórmeistari, ger av, hvør skal fáa eina ordan ella medalju. Um avgerðin snýr seg um onnur enn limir í svenska kongshúsinum, verður avgerð tikin við støði í innstilling

frá stjórnini. Er talan um protokollerar handanir, kemur innstillingin frá *Regeringskansliet* (svenska uttanríkisráðnum). Svenska stjórnin tekur avgerð um síni egnu tignarmerki.

Ordanarkanselliið er tænastueind hjá ordanarkapitlinum og ordanarráðnum. Kanselliið tekur sær av øllum viðurskiftum, sum snúgva seg um at viðgera og umsita handanir av kongligum riddaraordanum og medaljum. Starvsfólkini verða útnevnd av kongi og ordanarkanslaranum.

Eitt sjálvstøðugt ordanarráð er knýtt at ordanarkapitlinum. Ráðið viðger øll uppskot um persónar, sum mettir verða at hava uppiborið serligan heiður. Kongur ger av, hvør skal sita í ordanarráðnum eftir innstilling frá svensku stjórnini. Ráðið telur átta fólk, sum sita í fýra ár og kunnu veljast aftur í fýra ár afturat. Ráðið velur sjálvt formannin og næstformannin. Tveir serkønir, ein frá *Regeringskansliet* og ein frá verjuni, kunnu uttan at vera limir í ráðnum vera við á fundunum í ráðnum og úttala seg. Ein ritari frá ordanarkansellinum er eisini knýttur at ráðnum.

Uppgávan hjá ráðnum er at viðgera innkomin uppskot og at gera tilmæli um teir persónar, sum mettir verða at hava uppiborið heiður. Tilmælini verða latin svensku stjórnini. Stjórnin kemur síðan við innstillingum til ordanarkapitlið, sum tekur endaliga avgerð um, hvør skal fáa handað eina ordan ella medalju.

Fyri at kunna sita í ordanarráðnum eru krøvini til ráðslimir, at teir skulu hava stórt trúvirði, verða alment virdir og skulu saman umboða alt tað svenska samfelagið. Í sínum virki skal ráðið halda fast um trúvirðið í skipanini og almenna álitið á hana. Javnviðgerð og saklig atlit skulu eyðkenna virksemið. Limirnir skulu virka sjálvstøðugt og vera politiskt óheftir. Teir skulu ikki taka ímóti boðum frá øðrum og skulu ikki lata seg ávirka av fólki uttanfyri. Teir koma við sínum royndum til ráðið, men umboða ongan annan enn seg sjálvan.

## Handan

Ordanir og medaljur verða handaðar av kongi til hátíðarhald, ið kongshúsið skipar fyri. Handanin fer ofta fram við serlig høvi, eitt nú á tjóðardegi Svøríkis tann 6. juni ella í sambandi við almennar statsvitjanir. Handanir verða kunngjørdar á heimasíðu kongshúsins. Er talan um at handa tignarmerkini uttanlands, taka svensku sendistovurnar sær av tí.

## Útilokan og afturtøka

Um persónur tilmælir seg sjálvan til at fáa eina ordan ella medalju, verður viðkomandi útilokaður frá at fáa slíkan heiður. Ein ordan er ogn kongshúsins og skal latast ordanarkapitlinum aftur við deyða, ella um uppstigað verður til hægri ordan. Ein ordan kann krevjast aftur frá persóni, um viðkomandi verður dømdur fyri álvarsligt brotsverk.

## 6. Privat føroyskt tignarmerki

Í 2021 fór ein privatur felagsskapur, sum kallar seg Vitin, at heiðra borgarar í Føroyum fyri framúrskarandi og ósjálvsøkið avrik gjøgnum longri tíðarskeið, tí felagsskapurin helt tørv vera á hesum.

Vitin er ikki alment kendur, men verður umboðaður av advokati, sum handar heiðursmerki vegna felagsskapin. Felagsskapurin sigur seg vera óheftan av politiskum, átrúnaðarligum, fíggjarligum ella øðrum áhugamálum í síni meting av, hvør verður heiðraður. Ein lagsnevnd hevur ábyrgdina av Vitanum og ger av, hvør skal heiðrast. Lógin fyri lagsnevndina er ikki almenn. Vitin handar tignarmerki árliga um várjavndøgur í mars.

Heiðurin kann latast føroyingum og útlendingum og verður latin sum tignarmerki við tilhoyrandi heiðursbrævi og reversnál. Tignarmerkið er ein silvur- ella gulllagdur krossur við føroysku oyggjunum í miðjuni og tekstinum "Pro aris et focis" (fyri hjarta og heim). Heiðursbrævið grundgevur fyri heiðranini, lýsir endamálið við Vitanum, hvussu tignarmerkið sær út, hvussu tað verður borið, nær tað verður givið, og hvør tað er, sum gevur heiðurin.